# ÁRSFRÁGREIÐING 2017




LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

*Løgtingsins umboðsmaður*

*Ársfrágreiðingin 2017*

# ÁRSFRÁGREIÐINGIN 2017

Tórshavn, juni 2018

Løgtingsins umboðsmaður
Ársfrágreiðingin 2017
© 2017 Løgtingsins umboðsmaður
Sniðgeving og uppseting: Nudlavirkið
Myndir: Beinta á Torkilsheyggi
Mynd á síðu 59: Miriam & Janus
Prent: Føroyaprent

ISBN 978-99918-854-6-9

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur

LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

# Innihaldsyvirlit


I. Gongdin í 2017 .......................................... 8

II. Hagtøl ...................................................... 10

III. Álit .......................................................... 31

IV. Frágreiðingar ........................................... 41

V. Avvístar klagur ......................................... 47

VI. Grein: Grundgeving ................................. 51

VII. Grein: Málsviðgerðartíð ........................... 57

VIII. Um embætið ............................................ 64

IX. Skjøl ........................................................ 67

1. Løgtingslóg um Løgtingsins umboðsmann 67

2. Vegleiðing um Løgtingsins umboðsmann 72

3. Yvirlit yvir endaliga viðgjørdar klagur og frágreiðingar í 2017 ..................................... 77

# TIL LØGTINGIÐ

Vísandi til § 11, stk. 1 í løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann lati eg av hondum hesa frágreiðing um virksemi mítt í 2017. Ársfrágreiðingin skal sambært nevndu grein verða almannakunngjørd áðrenn 1. juli 2017.

Í seinastu ársfrágreiðing boðaði eg frá, at eg fór at broyta hagtalsskrásetingina. Hetta til tess at geva eina sannari mynd av virkseminum hjá umboðsmanninum. Umboðsmaðurin vísir á hvørjum ári ein stóran part av klagunum frá sær, men tað hevur ikki sæst aftur í hagtølunum, at fleiri av klagunum í roynd og veru hava fingið eina viðgerð, og at umboðsmaðurin í øðrum førum hevur hjálpt klagaranum við málinum.

Ársfrágreiðingin hevur í ár fingið nýtt snið, og lýsir hon virksemið hjá umboðsmanninum á ein betri og meira nútíðarhóskandi hátt.

Tórshavn, juni 2018

*Sólja í Ólavsstovu*

# I GONGDIN Í 2017

Í 2017 fekk umboðsmaðurin 50 klagur. Av hesum klagunum vórðu 45 endaliga avgreiddar innan 31. desember 2017. Harumframt vóru 11 klagur avgreiddar, sum vóru innkomnar (men ikki avgreiddar) árini frammanundan. Umframt tær ítøkiligu klagur, sum umboðsmaðurin fekk í 2017 tók umboðsmaðurin 4 mál upp av egnum ávum. Av hesum slagi av málum vóru 2 endaliga avgreidd við árslok 2017. Harumframt vórðu 3 mál avgreidd frá árunum frammanundan.

Talið av klagum er væl minni enn undanfarnu árini. Trý tey seinastu árini hevur talið av klagum ligið um 80, og vit skulu heilt aftur til 2012, at talið av klagum hevur verið so lágt.

Í 2017 er hagtalsskrásetingin broytt, soleiðis at eisini viðgerðin í teimum málum, sum ikki fáa gjølliga umboðsmansviðgerð ella enda við einum áliti, sæst aftur í hagtølunum.

Av klagunum, sum vóru avgreiddar í 2017, endaðu 11 við áliti, 33 klagur endaðu við einari aðrari viðgerð enn áliti, meðan 12 klagur vórðu avvístar.

Umboðsmaðurin hevur sett sær sum mál, at málsviðgerðin av klagum ikki skal vera meira enn 3 mánaðir aftaná, at partshoyringin av eini klagu er liðug. Í 2017 var miðal viðgerðartíðin av viðgjørdum og avvístum klagum 2 mánaðir, meðan viðgerðartíðin aftan á partshoyring bert var 15 dagar. Hetta er at fegnast um, men málið er alla tíðina at fáa viðgerðartíðina niður, uttan at hetta skal ganga út yvir dygdina í arbeiðinum.

Ein av uppgávunum hjá umboðsmanninum er at vegleiða og upplýsa um virksemið hjá stovninum. Við at greiða frá árliga virkseminum og skriva greinar um viðkomandi evnir, er tað gjørligt hjá Løgtinginum og øðrum áhugaðum at fylgja við í virkseminum hjá umboðsmanninum og fáa kunnleika til, hvussu ymisk mál og løgfrøðiligar spurningar verða viðgjørdar.

Í hesi ársfrágreiðing kunnu lesast stuttar frásagnir av ymiskum málum, sum umboðsmaðurin hevur viðgjørt í 2017. Álit og frágreiðingar eru at finna í síni fullu longd á heimasíðu umboðsmansins www.lum.fo

Somuleiðis kann lesast 2 greinar, um evnir, sum kunnu hava almennan áhuga.

Tann eina greinin umrøður grundgevingar fyri eini avgerð. Ein avgerð skal hjálpa einum borgara betri at skilja eina avgerð og góðtaka hana. Hon skal tryggja, at móttakarin hevur møguleika fyri at kanna, um avgerðin er røtt, at grundarlagið fyri avgerðini er sakligt, og at málið er nóg væl upplýst, áðrenn avgerð verður tikin. Krøvini til innihaldið í eini avgerð, kunnu lesast í greinini: *"Grundgeving"*.

Hin greinin umrøður stóra týdningin av, at almennir myndugleikar leggja dent á





Starvsfólkini hjá Løgtingsins umboðsmanni. Frá vinstru: Gurið Joensen, ráðgevi, Jette H. Eirikstoft, skrivstovufulltrúi, Sólja í Ólavsstovu, umboðsmaður, Jóhanna Arge, ráðgevi, og Elinborg Apol, ráðgevi

sína viðgerðartíð og javnan meta um, hvørt hon er nøktandi ella kann styttast. Long málsviðgerðartíð kann hava bæði fíggjarligar og persónligar avleiðingar fyri viðkomandi borgara. Hvørji atlit eiga at verða tikin í hesum sambandi, kann lesast í greinini: *"Málsviðgerðartíð"*.

Tann 29.-31. mai 2017 var umboðsmaðurin vertur fyri árliga norðurlendska barnaumboðsmansfundinum. Á hesum fundum verða umstøður og rættindi hjá børnum viðgjørd.

Tann 24.–25. august 2017 luttók umboðsmaðurin saman við sínum starvsfólkum á norðurlendskum juristfundi í Helsinki. Á hesum fundum verða viðgjørt áhugaverd løgfrøðilig evnir, sum hava týdning bæði innan fyri tað útinnandi og tað dømandi valdið. Hesir fundir verða hildnir 4. hvørt ár, og skiftast norðurlendsku londini at vera vertir fyri hesum fundum.

Tann 7.–8. september 2017 luttók umboðsmaðurin á Vestnorðurlendskum umboðsmannafundi í Nuuk, og tann 11. desember í Keypmannahavn. Á hesum fundum verða umrødd evni og spurningar, sum hava felags áhuga fyri allar stovnarnar. Hesir fundir verða vanliga hildnir tvær ferðir árliga.

# II HAGTØL

## Klagur innkomnar í 2017 býttar á myndugleikar

Talva 1

Í 2017 komu inn 50 klagur
Hesar klagurnar vóru býttar soleiðis millum ymisku myndugleikarnar:




## Klagur innkomnar í 2017 býttar á myndugleikar

Talva 1

| Myndugleiki | Klagur |
|---|---|
| Fíggjarmálaráðið | 2 |
| Fiskimálaráðið | 5 |
| Mentamálaráðið | 2 |
| Løgmansskrivstovan | 1 |
| Heilsu- og innlendismálaráðið | 1 |
| Samferðslumálaráðið | 2 |
| TAKS | 3 |
| Almannaverkið | 4 |
| Barnaverndartænastur | 5 |
| Føroya Kærustovnur | 2 |
| Umhvørvisstovan | 2 |
| Kringvarp Føroya | 1 |
| Kommunur | 11 |
| Heilsufrøðiliga starvsstovan | 2 |
| Búnaðargrunnurin | 2 |
| Kanningarstjóri settur av Løgtinginum | 1 |
| Vørn | 1 |
| VEKS | 1 |
| Vágs Ítróttarráð | 1 |
| Akstovan | 1 |
| **Tilsamans** | **50** |

## Innkomnar klagur í 2017 býttar á málsøki og klaguinnihald

Talva 2





## Innkomnar klagur í 2017 býttar á málsøki og klaguinnihald

Talva 2


| Málsøki | Tal av klagum | Klagur um avgerðir | Klagur um málsviðgerð | Klagur um atburð o.a. |
|---|---|---|---|---|
| Starvsfólkamál | 3 | 2 | 1 | 0 |
| Almannamál | 4 | 2 | 2 | 0 |
| Skattur v.m. | 7 | 5 | 2 | 0 |
| Fiskivinnumál | 3 | 1 | 2 | 0 |
| Búnaðarmál, byggimál, umhvørvi v.m. | 7 | 0 | 7 | 0 |
| Undirvísing, gransking, v.m. | 2 | 0 | 2 | 0 |
| Innlit | 11 | 4 | 7 | 0 |
| Barnaverndarmál | 5 | 1 | 4 | 0 |
| Arbeiðsmarknaðarmál | 1 | 1 | 0 | 0 |
| Ymiskt | 7 | 2 | 5 | 0 |
| **Tilsamans** | **50** | **18** | **32** | **0** |

## Klagur endaliga avgreiddar í 2017

Talva 3

Av teimum 50 klagunum, sum komu inn í 2017, vóru 45 endaliga avgreiddar innan 31. desember 2017.
Harumframt vóru avgreiddar 11 klagur frá undanfarnu árum.
Úrslitið av viðgerðini var hetta (býtt upp eftir myndugleika):






## Klagur endaliga avgreiddar í 2017

Talva 3

| Myndugleiki | Klagur | Avvístar | Onnur viðgerð | Viðgjørdar við áliti |
|---|---|---|---|---|
| Fíggjarmálaráðið | 2 | 1 | | 1 |
| Fiskimálaráðið | 4 | | 4 | |
| Mentamálaráðið | 3 | 1 | 1 | 1 |
| Løgmansskrivstovan | 1 | | | 1 |
| Uttanríkis- og vinnumálaráðið | 1 | | 1 | |
| Almannamálaráðið | 1 | | 1 | |
| Heilsu- og innlendismálaráðið | 1 | | 1 | |
| Samferðslumálaráðið | 2 | | 2 | |
| TAKS | 4 | 2 | 2 | |
| Almannaverkið | 4 | | 2 | 2 |
| Barnaverndartænastur | 5 | 1 | 3 | 1 |
| Føroya Kærustovnur | 1 | | 1 | |
| Umhvørvisstovan | 1 | | 1 | |
| Kringvarp Føroya | 1 | | 1 | |
| Kommunur | 14 | 4 | 7 | 3 |
| Heilsutrygd | 2 | | 2 | |
| Landssjúkrahúsið | 1 | | 1 | |
| Heilsufrøðiliga starvsstovan | 2 | | 2 | |
| Búnaðargrunnurin | 1 | | | 1 |
| Kanningarstjóri settur av Løgtinginum | 1 | 1 | | |
| Vágs Ítróttarráð | 1 | | 1 | |
| VEKS | 1 | | | 1 |
| Vørn | 1 | 1 | | |
| Akstovan | 1 | 1 | | |
| **Tilsamans** | **56** | **12** | **33** | **11** |

## Klagur viðgjørdar í 2017 har umboðsmaðurin veitti aðra viðgerð og hjálp til borgarar

Talva 4

Í 2017 vórðu viðgjørdar 33 klagur, har umboðsmaðurin veitti aðra viðgerð og hjálp til borgarar. Býtið teirra millum sæst niðanfyri:






## Klagur viðgjørdar í 2017 har umboðsmaðurin veitti aðra viðgerð og hjálp til borgarar

Talva 4

| | |
|---|---|
| Málið tikið uppaftur | 5 |
| Gongd komin á málið | 7 |
| Málið sent víðari til kærumyndugleika | 4 |
| Klagari vístur til kærumyndugleika | 2 |
| Umboðsmaðurin metti ikki grundarlag vera fyri at kanna málið | 14 |
| Annað | 1 |
| **Tilsamans** | **33** |

## Klagur avvístar í 2017

Talva 5

Í 2017 vóru 12 klagur avvístar av ymiskum orsøkum, harav 5 klagur frá undanfarnu árum. Býtið teirra millum sæst niðanfyri:




| Avvísingarorsøk | Klagur |
|---|---|
| Innkomin ov seint | 1 |
| Kærumøguleiki ikki troyttur | 2 |
| Uttanfyri heimildarøki | 9 |
| Afturkallað | 0 |
| **Tilsamans** | **12** |



## Viðgjørdar klagur í 2017 býttar á málsøki

Talva 6

Tey málini, sum vóru endaliga viðgjørd í 2017, kunnu býtast upp eftir málsøki á henda hátt:



### Viðgjørdar klagur í 2017 býttar á málsøki

Talva 6

| Málsøki | Klagur |
|---|---|
| Starvsfólkamál | 7 |
| Almannamál | 4 |
| Skattur v.m. | 8 |
| Fiskivinnumál | 4 |
| Búnaðarmál, byggimál, umhvørvi v.m. | 6 |
| Undirvísing, gransking, v.m. | 3 |
| Innlit | 10 |
| Barnaverndarmál | 4 |
| Arbeiðsmarknaðarmál | 2 |
| Ymiskt | 8 |
| **Tilsamans** | **56** |

### Innkomnar klagur 2001–2017

Talva 7



## Mál tikin upp av egnum ávum - eftirlitsvitjanir og kanningar

Talva 8

Av teimum 4 málum, sum umboðsmaðurin sjálvur tók upp í 2017, vóru 2 endaliga avgreidd innan 31. desember 2017. Harumframt vóru avgreidd 3 mál frá undanfarnu árum.

| **Málini vóru býtt soleiðis millum ymisku myndugleikarnar** | |
|---|---|
| Psykiatriski depilin | 1 |
| Barnaverndartænastur | 1 |
| Barnaverndarstovan | 1 |
| Fiskimálaráðið | 1 |
| Taks | 1 |
| **Tilsamans** | **5** |

## Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av viðgjørdum klagum

Talva 9

Í teimum 11 endaliga viðgjørdu klagunum í 2017, har álit varð skrivað, hevur miðalviðgerðartíðin verið hendan:
(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

| **Viðgerðartíð í miðal** | | |
|---|---|---|
| Aftan á partshoyring | 1 mðr. | 21 dagar |
| Samlað | 4 mðr. | 15 dagar |

## Málsviðgerðartíðin av klagum hjá umboðsmanninum, sum hevði við sær aðra viðgerð og hjálp til borgarar

Talva 10

Í teimum 33 klagunum, sum hevði við sær aðra viðgerð og hjálp til borgarar, hevur miðalviðgerðartíðin verið hendan:
(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

| **Viðgerðartíð í miðal** | | |
|---|---|---|
| Aftan á partshoyring | | 7 dagar |
| Samlað | 1 mðr. | 21 dagar |

## Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av avvístum klagum

Talva 11

Í teimum 12 avvístu klagunum hevur miðalviðgerðartíðin verið hendan:
(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

| **Viðgerðartíð í miðal** | |
|---|---|
| Aftan á partshoyring | 3 dagar |
| Samlað | 22 dagar |

### Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av bæði viðgjørdum og avvístum klagum

Talva 12

Fyri allar klagurnar, tvs. bæði avvístar og endaliga viðgjørdar klagur, hevur málsviðgerðartíðin í miðal verið hendan:
(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

| Viðgerðartíð í miðal | | |
|---|---|---|
| Aftan á partshoyring | | 15 dagar |
| Samlað | 2 mðr. | 0 dagar |

### Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av málum tikin upp av egnum ávum

Talva 13

Í teimum 5 málum, sum vóru avgreidd í 2017, hevur miðalviðgerðartíðin verið hendan:

| Viðgerðartíð í miðal | | |
|---|---|---|
| Aftan á partshoyring | | 13 dagar |
| Samlað | 3 mðr. | 15 dagar |



# Sammetingar 2015, 2016 og 2017

### Innkomnar klagur v.m.

Mynd 1



## Avvísingarorsøk

Mynd 2




* Víst verður til talvu 4 vegna broytta skráseting




## Innkomnar klagur býttar á málsøki

Mynd 3






### Klagur um avgerðir, málsviðgerð og atburð

Mynd 4




### Innkomnar klagur býttar á áðalráðini, kommunur o.a.

Mynd 5



**Mál tikin upp av egnum ávum - eftirlitsvitjanir og kanningar**

Mynd 6






# III ÁLIT

Umboðsmaðurin viðger klagur um avgerðir hjá myndugleikunum, eins og viðferð teirra av borgarum og málum. Ein borgari kann t.d. klaga um at ein umsókn er noktað, um tann valda viðgerðarháttin, um ta tíðina, sum hetta hevur tikið og/ella framferðarháttin hjá embætisfólkunum.

Um umboðsmaðurin, eftir at hava kannað málið, kemur til ta niðurstøðu, at hann gevur klagaranum viðhald, kann hann finnast at tí myndugleikanum, sum klagan snýr seg um. Umboðsmaðurin kann eisini heita á myndugleikan um at umhugsa málið av nýggjum og taka eina aðra avgerð. Umboðsmaðurin kann ikki sjálvur broyta eina avgerð. Uppgávan hjá umboðsmanninum er sostatt at greiða myndugleikanum frá, at hesin eftir hansara fatan hevur gjørt eitt mistak.

Niðanfyri eru dømir um mál, sum umboðsmaðurin hevur avgreitt við einum áliti ella hevur skrivað eina frágreiðing um.

MÁL NR. 17/00032

## Barnaverndartænasta bað um kontuavrit av órøttum

Ein mamma at tveimum umsorganaryvirtiknum børnum klagaði til umboðsmannin um eina barnaverndartænastu.

Barnaverndartænastan hevði fingið eitt prei frá eini fyrrverandi fosturmammu at tí eina barninum um, at mamman tók pengar út av uppsparingskontuni hjá barninum.

Barnaverndartænastan vendi sær síðani til bankarnar hjá børnunum og bað um kontuavrit av kontunum hjá børnunum. Samstundis upplýsti barnaverndartænastan fyri bankunum, at børnini vóru umsorganaryvirtikin.

Mamman helt tað ikki vera rætt, at barnaverndartænastan blandaði seg í peningaligu viðurskiftini hjá børnum hennara, tí hon hevði foreldramyndugleika yvir børnunum.

Umboðsmaðurin segði í síni niðurstøðu, at tá ein barnaverndartænasta yvirtekur umsorganarábyrgdina av einum barni, fær hon ábyrgdina av dagligu umsorganini av barninum. Tær avgerðir, sum barnaverndartænastan tekur viðvíkjandi viðurskiftunum hjá barninum, skulu verða neyðugar og viðvíkja viðurskiftum, sum hava við endamálið við umsorganaryvirtøkuna at gera.

Í hesum førinum hevði mamman foreldramyndugleika yvir børnunum, og einki serstakt var ásett um myndugleikan at virka í peningaligu viðurskiftunum hjá børnunum.

Umboðsmaðurin metti tí, at mamman kundi taka pening út av kontunum hjá børnunum, hóast tey vóru umsorganaryvirtikin, men vísti á, at mamman hevði skyldu til at røkja áhugamálini hjá børnunum.

Umboðsmaðurin vísti á, at barnaverndartænastan ikki hevði rætt til at biðja um kontuavrit av kontunum hjá børnunum, og at barnaverndartænastan ikki átti at havt upplýst fyri bankunum, at børnini vóru umsorganaryvirtikin, tí talan var um eymar persónligar upplýsingar, sum vóru fevndir av tagnarskyldu. Umboðsmaðurin gav barnaverndartænastuni eina átalu.

MÁL NR. 17/00025

## Borgarstjóri tók nevnd av ræði

Ein borgari í Havn vendi sær til umboðsmannin um parkeringsviðurskiftini í gøtuni, har hann búði. Í fleiri ár høvdu bilar staðið parkeraðir sum best bar til, og viðhvørt slapp t.d. oljubilurin ikki framat húsum hansara.

Tekniska nevnd og ferðslunevndin vóru samd um at seta parkeringsforboð á báðum síðum í smølu gøtuni, og parkeringsskelti vórðu sett upp. Parkeringsforboðið kom tó illa við hjá øðrum íbúgvum í gøtuni. Teir kærdu sína neyð til borgarstjóran, og úrslitið av hesum varð, at borgarstjórin gav umsitingini boð um at taka skeltini niður aftur.



Eitt lítið ár seinni gav kommunustjórin tó boð um at seta skeltini uppaftur, og kommunan kallaði nú allar grannarnar á fund at umrøða parkeringsviðurskiftini. Endin varð, at parkeringsforboð varð sett í aðrari síðuni í gøtuni.

Klagarin var bæði ónøgdur við, at borgarstjórin hevði givið eftir fyri kærandi grannunum og tikið parkeringsskeltini niður, og nýggju avgerðina um, at parkerast kundi í aðrari síðuni.

Umboðsmaðurin segði í sínari niðurstøðu, at eftir kommunustýrislógini er borgarstjórin einans leiðari fyri fyrisitingina. Hann leiðir ikki nevndir ella nevndarformenn, og borgarstjórin kann ikki broyta eina avgerð hjá teknisku nevnd. Til hetta krevst annaðhvørt ein býráðssamtykt ella, at tekniska nevnd tekur eina nýggja avgerð í málinum.

Í sínum ummæli av klaguni vísti kommunan á, at onnur áseting í kommunustýrislógini heimilar borgarstjóranum at taka avgerð í málum, ið ikki tola at bíða ella har ongin orsøk er til iva. Um hetta segði umboðsmaðurin, at hendan heimildin kundi einans brúkast til at taka avgerðir vegna býráðið – ikki vegna nevndirnar.

Borgarstjórin hevði sostatt handlað í heimildarloysi.

Av tí, at umboðsmaðurin ikki setti seg føran fyri at meta um, hvørt parkeringsforboð átti at verið á báðum ella bert aðrari síðuni, gjørdi umboðsmaðurin ikki meira við málið.

MÁL NR. 16/00118

## Mentamálaráðið gav skúlastjóra boð um ikki at úttala seg um framhaldsdeild í skúlanum

Foreldur at næmingum í einum skúla arbeiddu fyri, at framhaldsdeild skuldi skipast í skúlanum.

Skúlastjórin hevði úttalað seg um ymisk viðurskifti í sambandi við ætlanina at skipa framhaldsdeild í skúlanum og luttikið á fundum um hesi viðurskifti.

Í sambandi við eina samrøðu, sum kringvarpið hevði við skúlastjóran, um framhaldsdeild kundi skipast í skúlanum til skúlaárið 2016/2017 metti Mentamálaráðið, at skúlastjórin úttalaði seg á slíkan hátt, at hetta kundi skapa misskiljingar og óneyðugt órógv um málið. Av hesum gav Mentamálaráðið skúlastjóranum boð um




ikki at úttala seg alment um ætlanina at skipa framhaldsdeild í skúlanum og at halda seg burtur frá fundum um hesi viðurskifti.

Føroya Lærarafelag, sum umboðaði skúlastjóran, sendi klagu til umboðsmannin um boðini, sum Mentamálaráðið hevði givið skúlastjóranum. Felagið helt, at ráðið við sínum boðum setti til viks grundlógartryggjaðu rættindini hjá skúlastjóranum til at úttala seg. Teirra fatan var, at skúlastjórin hevði fullan rætt at umtala og kunna almenningin um almenn viðurskifti, sum snúði seg um hansara egna arbeiðs- og heimildarøki. Eisini hóast hansara fatan ikki heilt samsvaraði við ætlanirnar hjá Tórshavnar Býráði og møguliga eisini Mentamálaráðnum.

Mentamálaráðið vísti á, at eins og onnur alment sett starvsfólk, eru skúlastjórar í yvirskipaðari lóg tryggjaðir nøkur grundleggjandi politisk mannarættindi til eitt nú at úttala seg alment. Ráðið segði, at tað hevði ikki givið skúlastjóranum boð um ikki at úttala seg sum privatpersónur, men bert sum skúlastjóri, og at boðini tí ikki gjørdu seg inn á talufrælsið, sum skúlastjórin hevði sum privatpersónur. Mentamálaráðið vísti á, at ráðið hevði leiðslurættin í mun til skúlastjórastarvið og at boðini frá ráðnum, um ikki at úttala seg alment um skúlabygnaðin, løgu innan karmarnar av leiðslurættinum. Mentamálaráðið metti, at boðini vóru mett neyðug fyri at tryggja frið á økinum, politisku avgerðartilgongdina og virkisførleikan í ráðnum í mun til eina møguliga seinni viðgerð av umsókn um framhaldsdeild.

Avgerandi fyri, hvussu málið skuldi viðgerast, varð tí, um skúlastjórin hevði úttalað seg sum privatpersónur ella sum skúlastjóri.

Umboðsmaðurin metti, at skúlastjórin hevði ikki úttalað seg sum privatpersónur í hesum máli, men sum skúlastjóri. Boðini frá Mentamálaráðnum skuldu tí ikki viðgerast sum ein spurningur um brot á talufrælsi hjá almennum settum starvsfólki,

men sum ein spurningur um boðini vóru innan fyri karmarnar av leiðslurættinum, og um avgerðin hjá ráðnum varð tikin við atliti at vanligum fyrisitingarligum grundreglum.

Umboðsmaðurin kom til ta niðurstøðu, at boðini frá Mentamálaráðnum ikki vóru saklig og ikki stóðu mát við ítøkiligu støðuna í málinum. Av tí at útsagnirnar hjá skúlastjóranum ikki høvdu fingið nakra starvsfólkaliga fylgju, gjørdi umboðsmaðurin ikki meira við málið.

MÁL NR. 17/00026 OG MÁL NR. 17/00068

## Myndugleikar skulu fylgja kæruavgerðum

Ein undirskipaður myndugleiki er bundin av avgerðini hjá einum yvirskipaðum kærumyndugleika og hevur skyldu at akta avgerðina hjá hesum, eisini um myndugleikin ikki tekur undir við avgerðini. Við eini kæruavgerð fær borgarin sum meginregla rættarkrav upp á avgerðina, ið kærunevndin hevur tikið.

Bert í teimum serligu førunum, har ein avgerð, tikin av einum kærumyndugleika, er fongd við eyðsæddum og so mikið grovum feilum, at avgerðin má metast at vera ógildig, hevur ein undirskipaður myndugleiki ikki skyldu at akta avgerðini. Hetta kann eitt nú vera í førum, har talan er um avgerandi ógegni hjá kærunevndini. Men myndugleikin hevur tá skyldu at vísa á ógegni og royna møguleikarnar fyri at fáa málið uppafturtikið.

Er myndugleikin ósamdur í tulkingini hjá kærunevndini, kann hann, har tað er møguligt, kæra avgerðina víðari ella leggja málið fyri rættin. Tekur myndugleikin einki stig í mun til kæruavgerðina, stendur hon við, og tá hevur myndugleikin skyldu at fylgja kærunevndaravgerðini, so borgarin fær ta rættarstøðu, ið fylgir av avgerðini hjá kærunevndini.

Í 2017 viðgjørdi umboðsmaðurin tvær klagur um myndugleikar, sum ikki fylgdu eini kæruavgerð. Tann eina klagan var um, at Taks ikki fylgdi eini avgerð frá einari kommunalari skattakærunevnd, og hin klagan var um, at VEKS ikki hevði rættað seg eftir eini avgerð hjá kærunevndini í almanna- og heilsumálum.

Í klagumálinum um Taks (LUM 17/00026) hevði borgari fingið viðhald frá einari kommunalari skattakærunevnd í, at uppgerðarhátturin, sum Taks hevði nýtt í sambandi við umrokning av skatti, ið borgarin hevði goldið í útlandinum, var skeivur.

Taks vildi ikki fylgja kærunevndaravgerðini, tí mett var, at avgerðin var skeiv. Hóast hetta hevði Taks ikki nýtt møguleikan at kæra málið víðari til Skatta- og avgjaldskærunevndina, ella at leggja málið fyri Føroya Rætt. Ikki fyrr enn umboðsmaðurin kom inn í málið, valdi Taks at fylgja avgerðini frá kommunalu skattakærunevndini.

Umboðsmaðurin gav Taks eina átalu fyri handfaringina av málinum. Umboðsmaðurin vísti á, at tá Taks hevur møguleika fyri at royna eina kærunevndaravgerð frá einari kommunalari skattakærunevnd hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini, sum í skattabygnaðinum er yvir kommunalu skattakærunevndunum, eigur Taks at troyta hendan møguleika. Eisini varð víst á, at Taks ikki av sínum eintingum kann seta seg ímóti at fylgja eini avgerð frá eini kommunalari skattakærunevnd. Harumframt varð víst á, at Taks hevur møguleika at leggja slík mál fyri Føroya Rætt.

Í klagumálinum um VEKS (LUM 17/00068) hevði VEKS sýtt klagaranum samsýning fyri at ansa konu síni heima við teirri grundgeving, at kona klagarans fekk heimahjálp. Kærunevndin helt avgerðina vera skeiva og tók avgerð um, at klagarin hevði rætt til ansingarsamsýning upp á áleið 60.000 kr.

Ansingarsamsýningin varð ikki útgoldin klagaranum fyrr enn knappar fimm mánaðir eftir, at kærunevndin tók avgerð í málinum. Tá var málið bæði klagað til umboðsmannin og stevning latin rættinum.

Umboðsmaðurin vísti á, at VEKS hevði skyldu at akta avgerðina hjá kærunevndini, at klagarin við avgerðini hjá kærunevndini fekk eitt rættarkrav upp á at fáa ansingarsamsýningina útgoldna skjótast gjørligt, og at VEKS hevði skyldu til at útgjalda ansingarsamsýningina uttan óneyðugt drál.

Hóast drúgva avgreiðslutíðin partvís skyldaðist umberandi umstøður, helt umboðsmaðurin tað als ikki vera nøktandi, at ansingarsamsýningin ikki varð útgoldin klagaranum fyrr enn knappar fimm mánaðir eftir, at kærunevndin tók avgerð í málinum. Umboðsmaðurin fýltist eisini á, at tað var neyðugt at senda VEKS tvær áminningar fyri at fáa eina frágreiðing um málið, og at tað tók VEKS meira enn tveir mánaðir at senda umboðsmanninum skjølini í málinum. Umboðsmaðurin gav VEKS eina átalu fyri handfaringina av málinum.

MÁL NR. 16/00123

## Long útlit fyri innliti

Ein tilboðsgevari, sum hevði bjóðað upp á at byggja barnagarð í eini minni kommunu vendi sær til umboðsmannin og greiddi frá, at hann fyri knappliga einum ári síðani hevði biðið um innlit í øll skjøl í málinum at byggja barnagarðin í kommununi. Kommunan hevði fleiri ferðir boðað honum frá, at hann skuldi fáa innlit, men einki hendi í málinum.

Eftir at klagan var send umboðsmanninum, og áðrenn umboðsmaðurin var liðugur við viðgerðina, gav kommunan klagaranum innlit í skjølini í málinum at byggja barnagarðin.

Umboðsmaðurin legði út við at staðfesta, at § 16, stk. 1 í innlitslógini áleggur myndugleikum eina skyldu at taka støðu til eina innlitsáheitan skjótast gjørligt. Tað er ofta av stórum týdningi fyri bæði borgarar og fjølmiðlar at fáa skjalainnlit í eitt mál so skjótt sum gjørligt, og endamálið við nevndu ásetingini er júst at tryggja eina skjóta viðgerð av innlitsáheitanum. Klagarin hevði bjóðað upp á ein part av



arbeiðinum at gera barnagarðin, og hann hevði fyri neyðini at eftirkanna málsviðgerðina hjá kommununi.

Kommunan greiddi umboðsmanninum frá, at drúgva viðgerðin stóðst av, at kommunan hevði ikki øll skjølini í málinum til taks. Víst varð m.a. á, at biðið varð um innlit í sáttmálar, sum ikki vóru gjørdir um hetta mundið. Kommunan helt eisini innlitsáheitanina vera so umfatandi.

Um hetta segði umboðsmaðurin, at kommunan hevði skyldu til at geva klagaranum innlit í tey skjøl, sum hon hevði til taks, og sum vóru fevnd av rættinum til innlit. Málið nýttist ikki at vera liðugt viðgjørt, og avgreiðslan av eini innlitsáheitan kann ikki útsetast við teirri grundgeving, at nøkur av skjølunum eru ikki gjørd enn.

Umboðsmaðurin skilti ikki reiðiliga, hvat kommunan meinti við, tá hon førdi fram, at innlitsáheitanin var so umfatandi. Innlitsumbønin var greið – klagarin bað um fáa innlit í øll skjølini í málinum, og eftir at umboðsmaðurin hevði gjøgnumgingið málið, var greitt, at umbønin fevndi um eina sera avmarkaða nøgd av skjølum.

Umboðsmaðurin helt hvørki vavið á skjølunum ella umstøðurnar í málinum á nakran hátt kundu umbera, at tað tók eitt heilt ár at geva klagaranum innlit, og umboðsmaðurin gav tí kommununi eina álvarsliga átalu fyri at lata innlitsáheitanina liggja óavgreidda í so langa tíð.

Samsvarandi § 10, stk. 1 í umboðsmanslógini varð niðurstøðan eisini send formansskapinum í Løgtinginum, løgmanni og landsstýrismanninum í Heilsu- og innlendismálum.



# IV FRÁGREIÐINGAR

Umboðsmaðurin kann kanna eitt mál, uttan at tað finst nøkur klaga hesum viðvíkjandi. Umrøða í fjølmiðlunum kann t.d. hava við sær, at umboðsmaðurin gerst varur við eitt mál, sum hann ynskir at kanna nærri. Onkuntíð kunnu klagur vera orsøk til, at umboðsmaðurin fer at kanna viðurskifti, sum tað ikki er klagað um.

Niðanfyri eru dømir um mál, sum umboðsmaðurin hevur kannað og skrivað eina frágreiðing um.

MÁL NR. 14/00129

## Kanning av umsiting av veiðiloyvum í Fiskimálaráðnum

Umboðsmaðurin heitti í skrivi tann 28. oktober 2014 á Fiskimálaráðið um at geva sær eina frágreiðing um umsitingina av veiðiloyvum.

Umboðsmaðurin vísti á, at sambært § 5, stk. 3, í lógini um vinnuligan fiskiskap er eitt veiðiloyvi ein góðkenning, ið landsstýrismaðurin veitir einum ávísum fiskifari. Veiðiloyvið er knýtt at fiskifarinum, og er tann almenna góðkenningin av, at ávíst fiskifar kann veiða á føroysku landleiðini og uttan fyri hana. Í § 3 í kunngerð nr. 54 frá 26. mars 1993 um veiðiloyvi til føroysk fiskiskip verður sett sum treyt fyri veiðiloyvi, at skipið er løggilt, og at ásetingar í kunngerðum og veiðiloyvum, herundir serligum fiskiloyvum, viðvíkjandi reglum um fiskiskap, veiðireglum, uppgávuskyldum o.ø. verða hildnar, og at broytingar, umbyggingar o.a. ikki munandi hava broytt veiðiorku og fiskimøguleikar. Veiðiloyvið er sostatt **eitt prógv** (mín undirstriking), sum gevur einum fiskifari loyvi til at fiska. Sambært § 8, kann eitt veiðiloyvi verða flutt til,

1. eitt annað fiskifar uttan veiðiloyvi,
2. til annað fiskifar við veiðiloyvi, og
3. veiðiloyvi frá tveimum fiskiførum kann verða flutt til annað fiskifar uttan veiðiloyvi.

Tað eru sostatt fleiri møguleikar at flyta veiðiloyvi frá einum fiskifari til eitt annað og at leggja veiðiloyvir saman. Tað hava verið nógvar broytingar í fiskiflotanum, síðani lógin um vinnuligan fiskiskap kom í gildi í 1994, og sambært álitinum um endurskoðan av lógini um vinnuligan fiskiskap frá 2007, sæst á blaðsíðu 17, at talið av veiðiloyvum í 1996 var 160, og at hetta tal í 2007 var minkað niður í 120. Sagt verður víðari, "at talið á veiðiloyvum í dag er lægri enn 1. januar inniber ikki, at til ber at økja talið aftur upp til talið, ið var 1. januar 1995."

Í frágreiðingini frá Fiskimálaráðnum verður sagt, at veiðiloyvini ikki hava verið skrivað sum serstakt skjal. Frumrit ella avrit av veiðiloyvum eru tí hvørki ávikavist

send skipaeigara ella goymd í skjalagoymsluni hjá Fiskimálaráðnum. Fiskimálaráðið sigur samstundis, at ráðið ikki hevur nakra skrásetingarskipan viðvíkjandi veiðiloyvum og heldur onki serstakt skjal yvir hesi veiðiloyvi.

Umboðsmaðurin bað í hesum sambandi Fiskimálaráðið greiða sær frá, hvussu ráðið tryggjar sær, at tað altíð er samsvar millum veiðiloyvi, fiskiorku og fiskiloyvi.

1. Hvørji skjalfest prógv hevur ráðið fyri, at fiskiorkan ikki økist, tá afturvendandi broytingar fara fram í einum veiðiloyvi í sambandi við samanleggingum av veiðiloyvum?
2. Hvussu skjalfestir ein umsøkjari av einum veiðiloyvi, hvørji rættindi hann hevur til fiskiskap, fiskiorku v.m., tá hann onki veiðiloyvi hevur, sum prógvar hetta?
3. Hvussu skrásetur Fiskimálaráðið tær ymisku samanleggingar og broytingar í einum veiðiloyvi?

Aftaná fund um málið og ymiskt samskifti millum umboðsmannin og Fiskimálaráðið fekk umboðsmaðurin tann 10. februar 2017 tað tilfar, sum umboðsmaðurin hevði biðið um.

Í skrivi, dagfest 18. august 2017 boðaði Løgtingsins umboðsmaður Fiskimálaráðnum frá, at av tí at landsstýrið arbeiðir við einari nýggjari fiskivinnuskipan hevur umboðsmaðurin avgjørt ikki at gera meira við málið.

MÁL NR. 16/00088

## Umboðsmaðurin á eftirlitsvitjan á Psykiatriska deplinum

Í oktober 2016 var umboðsmaðurin á eftirlitsvitjan á Psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum. Eftirlitsvitjanin fevndi fyrst og fremst um stongda partin av psykiatrisku viðgerðareindini P40, og dentur varð lagdur á at kanna, um krøvini um tvingsil í psykiatrilógini verða hildin.

*Sjúklingarættindi og tvingsilsgerðabók*

Við nýggju psykiatrilógini, sum varð sett í gildi 1. oktober 2009, vórðu krøvini til nýtslu av tvingsli innan psykiatriina herd og rættindini hjá sjúklingum undir tvingsli munandi styrkt.

Umboðsmaðurin staðfesti, at skipaðar mannagongdir vóru fyri, nær og hvussu tvingsilsgerðabókin skal førast, og at atlit vórðu tikin til ymisku lógarkrøvini í sambandi við skráseting í tvingsilsgerðabókini.

Umboðsmaðurin hevði tó m.a. hesar viðmerkingar til skrásetingina í tvingsilsgerðabókini:








- Grundarlagið fyri frælsistøku var ikki í øllum førum eftirkannað til tíðina.
- Í fleiri førum vóru eftirkanningar av fastspentum sjúklingum ikki framdar 3 ferðir um samdøgrið, sum ásett er, ella býttar javnt yvir samdøgrið.
- Skrásetingin av nøvnum á teimum, sum viðvirka til eina tvingsilsfyriskipan, var ikki nøktandi.

Landssjúkrahúsið og Heilsu- og innlendismálaráðið hava boðað umboðsmanninum frá, at stig verða tikin til tess at tryggja, at ásetingarnar í psykiatrilógini verða hildnar.

Umboðsmaðurin vísti somuleiðis á, at í fleiri førum var ikki skrásett, um sjúklingurin hevði givið samtykki til viðgerðarætlanina, um viðgerðarætlan varð útflýggjað sjúklinginum, um kunnað samtykki var givið, eins og dagføring av viðgerðarætlan ikki var skrásett.



Landssjúkrahúsið hevur boðað frá, at arbeitt verður við at betra um skjalfestingina av hesum viðurskiftum, og Heilsu- og innlendismálaráðið hevur boðað frá, at ráðið fylgir hesum arbeiði.

*Heilivágsgoymsla*
Undir eftirlitsvitjanini varð upplýst, at einki skipað eftirlit var við heilivágsgoymsluni á Psykiatriska deplinum, og at goymslan einans varð kannað, um illgruni var um óreglusemi. Hetta helt umboðsmaðurin als ikki vera nøktandi.

Tá umboðsmaðurin hevði skrivað hetta, upplýsti Landssjúkrahúsið, at skrivligar mannagongdir og vegleiðingar vóru um handfaring av heilivági. Landssjúkrahúsið metti, at nøktandi og skipað eftirlit var á ymisku deildunum.

Hetta samsvaraði ikki við tað, sum varð upplýst undir eftirlitsvitjanini, og umboðsmaðurin vísti á, at somu viðmerkingar um vantandi eftirlit við heilivágsgoymslum

stóðu í frágreiðingini um dygdarmeting av Landssjúkrahúsinum frá februar 2017.

Heilsu- og innlendismálaráðið lovaði at taka spurningin um eftirlit við heilivágsgoymsluni upp við leiðsluna á Landssjúkrahúsinum.

*Hølisviðurskifti v.m.*
Tá umboðsmaðurin á fyrsta sinni var á eftirlitsvitjan á Psykiatriska deplinum í 2002 varð nógv gjørt burtur úr at viðmerkja vánaligu hølisumstøðurnar hjá sjúklingunum. Viðurskiftini eru nógv broytt síðani, og eftir ætlan flytur psykiatriin í nýggj hølir í 2021. Umboðsmaðurin legði tískil ikki eins stóran dent á hølisumstøðurnar á Psykiatriska deplinum.

Mælt varð tó til at bøta um baði- og vesiumstøðurnar, sum umboðsmaðurin als ikki helt vera nøktandi. Landssjúkrahúsið hevur greitt umboðsmanninum frá, at Landssjúkrahúsið hevur ikki møguleika til slíka kostnaðarmikla umbygging, sum hetta krevur, og Heilsu- og innlendismálaráðið hevur víst á, at í 2021 hava sjúklingar einastovur við vesi og baði.

Umboðsmaðurin helt tað í nøkrum førum vera tørv á at gera ábøtur beinanvegin, umframt at bøtast kundi um onnur viðurskifti við smærri broytingum. Víst varð m.a. á, at tað lak um eitt vindeyga, at inngongdin til fysioterapiina var sjónliga forfallin, og at innrættingin av vitjanarrúmi og sjúklingastovum kravdi dagføring. Mælt varð harumframt til at kanna møguligar rýmingarleiðir í garðinum og at tryggja, at roykur frá roykirúminum ikki var til ampa fyri starvsfólk og sjúklingar.

Fleiri av hesum viðurskiftum vórðu umrødd undir eftirlitsvitjanini, og bøtt varð um tey beinanvegin, meðan annað var í gongd, tá umboðsmaðurin læt frágreiðingina úr hondum.

*Heilsubøtandi virksemi*
Sjúklingar, sum vóru innlagdir, undir eftirlitsvitjanini høvdu frammanundan fingið fráboðan um, at møguleiki var at tosa við umboðsmannin, ynsktu teir tað. Ein teirra, sum hevði verið innlagdur fleiri ferðir, gjørdi vart við, at tað ikki longur vóru somu møguleikar at stytta sær stundir við ymiskum frítíðarvirksemi. Umboðsmaðurin mælti Psykiatriska deplinum til at umhugsa at geva serliga sjúklingum, sum vóru innlagdir í eitt longri tíðarskeið, og sum ikki vóru so væl førir fyri at luttaka í virksemi uttan fyri depilin, lættari atgongd til ymiskt virksemi at stytta sær stundir við.

Landssjúkrahúsið hevur boðað umboðsmanninum frá, at hetta verður tikið við í framtíðar tilrættaleggjan av deplinum.



# V AVVÍSTAR KLAGUR

Umboðsmaðurin hevur ikki skyldu til at taka allar klagur upp til viðgerðar. Ein klaga verður altíð kannað gjølla, áðrenn avgerð verður tikin til, um hon skal avvísast. Í tílíkum metingum verður vanliga hugt at, um tað eru útlit fyri, at umboðsmaðurin kann hjálpa viðkomandi.

Ein avvísing av einari klagu kann vera úrslitið av einari víðfevndari málsviðgerð hjá umboðsmanninum.

Niðanfyri eru dømir um mál, sum umboðsmaðurin hevur valt at avvísa av ymiskum orsøkum.

### 1. Umboðsmaðurin kann einans viðgera mál, sum eru viðgjørd av myndugleikum ella stovnum, sum hoyra til almennu fyrisitingina.

Sambært § 4 í umboðsmanslógini fevnir virksemi umboðsmansins um allar føroyskar myndugleikar og stovnar v.m., sum sambært fyrisitingarlógini verða roknaðir við til almennu fyrisitingina.

#### MÁL NR. 17/00035
Ein borgari klagaði til umboðsmannin um, at stuðulin til dupult húsarhald var ov lágur, at stuðulin ikki samsvaraði við høgu leiguprísirnar í miðstaðarøkinum, og at klagarin tí var fyri mismuni í mun til sínar starvsfelagar. Umboðsmaðurin vísti klagaranum á, at umboðsmaðurin kann ikki broyta lógir og tekur heldur ikki støðu til, um lógir áttu at verið broyttar.

#### MÁL NR. 17/00057
Ein borgari klagaði til umboðsmannin um handfaringina hjá eini kommunu av einum máli um eitt grundstykki. Eftir at kommunan hevði greitt umboðsmanninum frá málinum stóð greitt, at kommunan hevði latið rættinum stevning í málinum við kravi um, at grundstykkið varð skeytað aftur til kommununa. Umboðsmaðurin boðaði klagaranum frá, at mál ikki vera viðgjørd, sum longu eru ella fara at verða viðgjørd í rættinum.

#### MÁL NR. 17/00070
Ein borgari klagaði til umboðsmannin um, at Fíggjarmálaráðið í tvey ár einki hevði gjørt fyri at broyta meirvirðisgjaldslógina við tí endamáli at frítaka investeringsgull fyri meirvirðisgjald. Umboðsmaðurin vísti klagaranum á, at tað er ein politiskur spurningur, um broytingar skulu gerast í lóggávu, og at tað liggur uttanfyri heimildirnar hjá umboðsmanninum at hava eina meining um tað.

#### MÁL NR. 17/00074
Ein fjølmiðil klagaði til umboðsmannin um, at Vágs Ítróttarráð sýtti fyri at geva innlit í málið viðvíkjandi bygging av marghøll. Ítróttarráðið metti ikki, at innlits-



lógin var galdandi fyri teirra virksemi. Hesum var umboðsmaðurin samdur í. Vágs Ítróttarráð er ein sjálvsognarstovnur, sum ikki er ein partur av almennu fyrisitingini. Umboðsmaðurin boðaði tí klagaranum frá, at hann kundi ikki viðgera klaguna.

## 2. Hægsti myndugleiki á økinum skal hava tikið avgerð í málinum, áðrenn umboðsmaðurin kann viðgera eina klagu um eitt mál.

Sambært § 6, stk. 3 kann ein klaga ikki sendast umboðsmanninum um avgerðir, ið møguligur hægri myndugleiki kann broyta, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum.

### MÁL NR. 17/00045

Ein borgari klagaði vegna konu sína til umboðsmannin um, at hon var áløgd at gjalda kringvarpsgjald, hóast hon onga inntøku hevði. Tað er ásett í kringvarpslógini, at fyrisitingarligar avgerðir hjá Kringvarpinum kunnu kærast til Mentamálaráðið, og tískil sendi umboðsmaðurin klaguna í fyrsta umfari til Mentamálaráðið at viðgera.

### MÁL NR. 17/00071

Ein borgari klagaði til umboðsmannin um, at hann ikki hevði fingið eitt starv hjá einum almennum myndugleiki. Umboðsmaðurin greiddi klagaranum frá, at hann fyrst mátti kæra avslagið upp á starvsumsóknina til aðalráðið og bíða eftir teirra avgerð í málinum, áðrenn hann kundi senda umboðsmanninum eina klagu um málið.

## 3. Mál sum eru loyst undir klaguviðgerðini, og tí var ikki grundarlag fyri at gera meira við klaguna.

Sambært § 6 stk. 4 tekur umboðsmaðurin støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í máli, ið klagað verður um. Metir umboðsmaðurin, at grundarlag ikki er fyri at gera meira við málið, verður klagan avvíst.

### MÁL NR. 17/00058

Ein borgari klagaði um, at hann ikki hevði fingið innlit frá Fiskimálaráðnum. Fiskimálaráðið greiddi umboðsmanninum frá, at Ráðið hevði givið klagaranum boð um, at umbønin um innlit ikki kundi avgreiðast innan 10 daga freistina í lógini, og at eftir at klagað varð til umboðsmannin, hevði Fiskimálaráðið avgreitt innlitsumbønina. Tá málið varð loyst undir klaguviðgerðini, metti umboðsmaðurin, at grundarlag varð ikki fyri at gera meira við klaguna.

### MÁL NR. 17/00086

Ein borgari klagaði til umboðsmannin um, at hóast hann hevði heitt á Skatta- og avgjaldskærunevndina um at sleppa á fund við nevndina, hevði nevndin tikið avgerð, uttan at hann hevði fingið fundarboð. Eftir at umboðsmaðurin hevði víst Føroya Kærustovni á, at sambært § 25 stk. 1 í lógini um Toll- og skattafyrisiting skal kærandi, tá hann biður um tað, sleppa at siga fram sína áskoðan munnliga fyri

nevndini, játtaði Kærustovnurin at skipa soleiðis fyri, at málið verður tikið uppaftur, og at klagarin fær møguleika at koma á fund við Skatta- og avgjaldskærunevndina, áðrenn nýggj avgerð verður tikin. Eftir hetta boðaði umboðsmaðurin klagaranum frá, at grundarlag varð ikki fyri at gera meira við klaguna.

### MÁL NR. 17/00072

Ein advokatur klagaði vegna ein borgara um, at Umhvørvisstovan ikki svaraði eini umsókn um matrikulering og heldur ikki áminningum um málið. Umhvørvisstovan upplýsti fyri umboðsmanninum, at viðgerðartíðin fyri matrikuler mál var minst eitt hálvt ár, og at ítøkiliga umsóknin var tikin til viðgerðar. Umboðsmaðurin boðaði tí klagaranum frá, at grundarlag var ikki fyri at gera meira við klaguna. Umboðsmaðurin viðmerkti, at sambært góðum fyrisitingarsiði átti Umhvørvisstovan at havt upplýst klagaranum um viðgerðartíðina.

## 4. Frágreiðingin frá myndugleikanum um málið gjørdi, at umboðsmaðurin metti, at grundarlag var ikki fyri at gera meira við málið.

### MÁL NR. 16/00076 OG MÁL NR. 17/00075

Ein borgari klagaði um, at Heilsu- og innlendismálaráðið hevði staðfest eina avgerð hjá Navnanevndini og Umhvørvisstovuni um ikki at loyva klagaranum at broyta stavsetingina av navni sínum. Avgerðirnar vóru tiknar sambært lógini um fólkanøvn. Umboðsmaðurin hevði einki at viðmerkja til kæruavgerðina hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum, og avgjørdi tí ikki at gera meira við klagumálið. Umboðsmaðurin vísti tó samstundis klagaranum á, at tá talan var um at broyta stavseting, sum sambært klagaran var íkomin av einum feili, tá navnið var ført í kirkjubókina, kundi klagarin taka málið upp við kirkjubókaførandi sóknarprestin og Mentamálaráðið. Seinni kunnaði klagarin umboðsmannin um, at Mentamálaráðið hevði játtað honum at broyta stavsetingina av navninum.

## 5. Klagarin tók klaguna aftur, tí málið var loyst undir klaguviðgerðini.

### MÁL NR. 17/00067

Klagað varð um, at Tórshavnar kommuna ikki avgreiddi eina umsókn um innlit innanfyri tær freistir, sum lógin um alment innlit setir. Eftir at umboðsmaðurin kom inn í málið, avgreiddi myndugleikin innlitsumbønina frá klagaranum. Eftir hetta tók klagarin klaguna aftur.

### MÁL NR. 17/00056

Klagað varð um, at Fiskimálaráðið hevði sýtt klagaranum innlit í ein innanhýsis teldupost hjá Ráðnum. Undir klaguviðgerðini broytti Fiskimálaráðið støðu, og játtaði klagaranum innlit. Eftir hetta tók klagarin klaguna aftur.





Sólja í Ólavsstovu, umboðsmaður

# VI GRUNDGEVING

*"Eg søkti leysa starvið og fekk noktandi svar. Svarið, sum eg fekk, innihelt onga grundgeving, og heldur ikki var sagt nakað um, hvør ið settur var. Eg ringdi sama dag til borgarstjóran og bað um eina grundgeving"*

*Umsøkjarin hevði onga skrivliga grundgeving fingið fyri, hví hon ikki fekk starvið, hon hevði søkt. Borgarstjórin umbar seg við, at hann ikki var greiður yvir, at tað var eitt krav at geva eina skrivliga grundgeving, men at hann hevði grundgivið munnliga fyri avgerðini. Kommunan grundgav avgerðina við, at kommunustýrið metti, at tann, sum var sett í starvið, var tann rætta, og at hon hevði kvalifiseraðar førleikar. Hesa grundgeving metti umboðsmaðurin ikki lúka treytirnar í § 23 í fyrisitingarlógini. Sambært hesari áseting skal grundgevingin geva eina frágreiðing um, hví avgerðin fekk ta innihald, hon fekk, og hví mett var, at førleikin hjá tí, ið sett var í starvið, svaraði betur til settu krøvini, enn førleikin hjá tí, ið ikki var sett – eitt nú viðvíkjandi útbúgving, starvsroyndum, persónligum eginleikum o.s.fr. (LUM 14/00038)"*

### Endamál

Ein avgerð skal, tá hon verður fráboðað skrivliga, hava eina grundgeving, uttan so, at avgerðin til fulnar gongur partinum á møti. Hetta framgongur av § 21 í fyrisitingarlógini. Grundgevingin skal verða givin partinum samstundis, sum avgerðin verður fráboðað honum.

Grundgeving fyri eini avgerð skal hjálpa einum borgara betur at skilja eina avgerð og góðtaka hana. Henda skal tryggja, at móttakarin hevur møguleika fyri at kanna, um avgerðin er røtt, at grundarlagið fyri avgerðini er sakligt, og at málið er nøktandi upplýst, áðrenn avgerð verður tikin.

Ein grundgeving gevur harumframt móttakaranum eitt grundarlag fyri at taka støðu til, um avgerðin skal kærast til eina kærunevnd ella skal klagast til umboðsmannin.

### Innihald

Grundgevingin skal hava eina tilvísing til tær rættarreglur, sum avgerðin er grundað á. Avgerðin skal í tann mun, tað er neyðugt, hava eina stutta frágreiðing um tær veruligu umstøður, sum avgerðin byggir á. Í teimum førum avgerðin byggir á eina fyrisitingarliga meting, skulu tey atlit, sum avgerðin byggir á, síggjast aftur í grundgevingini.

### Skrivligar og munnligar avgerðir

Tað er onki krav í fyrisitingarlógini um, at ein avgerð skal fráboðast skrivliga, men sambært § 22, stk. 1, kann hann, sum munnliga hevur fingið boð um eina avgerð, krevja at fáa skrivliga grundgeving fyri avgerðina.

Avgerðir, sum mugu metast at vera tyngjandi fyri móttakaran, eiga eftir góðum fyrisitingarsiði at verða fráboðaðar skrivliga, soleiðis at móttakarin fær betri grundarlag fyri at taka støðu til, um hann skal góðtaka avgerðina ella kæra hana til ein kærumyndugleika.

*Í klagu um eina munnliga avgerð hevði klagarin, hóast hann hevur biðið um hetta, onga grundgeving fingið fyri avgerðini um at nokta honum fylgjara til sjúkraviðgerð uttanlands. Umboðsmaðurin metti, at avgerð, um at nokta umsókn um fylgjara, er ein byrða hjá móttakaranum, tí hesin er í einari viðkvæmari støðu vegna sjúku. Umboðsmaðurin metti tí, at sambært góðum fyrisitingarsiði átti myndugleikin at givið umsøkjara skrivliga grundaða avgerð í teimum førum, har umsókn um fylgjara til sjúkraviðgerð ikki verður gingin á møti. (LUM 14/0007)*

### Partvíst noktað avgerð

Kravið um grundgeving er bert galdandi, um ein avgerð ikki gevur einum parti fult viðhald. Um ein partur bert partvíst fær viðhald skal myndugleikin grundgeva fyri hesum partinum av avgerðini.

*Eftir umbøn fekk ein journalistur innlit í skjøl og skjalayvirlit í einum máli hjá Mentamálaráðnum. Í svarinum frá Mentamálaráðnum kundi ein fáa ta fatan, at Mentamálaráðið hevði sent journalistinum øll skjølini í málinum. Í málinum lá tó eisini eitt skjalayvirlit, har tað út fyri nøkur av skjølunum var sett eitt minustekn, og hetta kundi bent á, at journalisturin ikki hevði fingið innlit í øll skjølini í málinum. Umboðsmaðurin gjørdi vart við, at eitt innlitsmál er eitt vanligt fyrisitingarligt mál, og at Mentamálaráðið hevði tískil skyldu til at greiða journalistinum frá, um hann fekk innlit í øll skjølini ella ikki. Fekk journalisturin ikki innlit í øll skjølini, var talan um, at Mentamálaráðið partvís sýtti umbønini, og í einum slíkum føri hevði Mentamálaráðið sambært §§ 21 – 23 í fyrisitingarlógini skyldu til at greiða frá, hvørji skjøl, innlit ikki varð givið í, og hvør grundgevingin var fyri hesum. (LUM 15/00060)*

### Neyvari grundgeving

Tað kann serliga í setanarmálum vera trupult at grundgeva fyri, hví ein ávísur umsøkjari ikki hevur fingið starv. Í slíkum førum eigur at verða víst serligt fyrilit, tí ein óheppin orðað grundgeving kann gerast steinur oman á byrðu hjá tí umsøkjara, sum ikki fær starvið. Hinvegin krevur lógin, at ein grundgeving verður givin teimum umsøkjarum, sum fáa skrivliga fráboðan um, at teir ikki hava fingið starvið. Hevur umsøkjari verið til samrøðu, eigur hesin, um hann ynskir hetta, at fáa eina neyvari frágreiðing um, hví hann ikki fekk starvið.

*Í klagu um vantandi starvssetan av landsverkfrøðingi segði umboðsmaðurin, at klagarin, sum hevði virkað á stovninum í 23 ár, harav 10 ár sum leiðari, átti at fingið eina sera gjølliga frágreiðing, og eina neyva grundgeving fyri, at hann ikki skuldi setast í tað starv, sum hann var sagdur úr við teirri grundgeving, at starvið skuldi leggjast niður. (LUM 200200005)*

### Kann ikki víkja frá lógarásetta kravinum

Ein myndugleiki kann ikki víkja frá lógarásetta kravinum um grundgeving, uttan at heimild er fyri hesum.

*Í klagu um stuðul til mvg, hevði klagarin onga fráboðan fingið um avgerðina. Hann fekk sostatt heldur ikki grundgeving og kæruvegleiðing viðvíkjandi avgerðini. Í svarskrivi greiddi TAKS frá, at um munurin var undir kr. 300,00, var ikki skrivað út til umsøkjararnar. Hetta varð gjørt fyri at TAKS ikki skal drukna í umsiting, tí tað ógvuliga ofta var munur á tí, ið søkt varð um og tað, sum varð útgoldið. Til hetta segði umboðsmaðurin, at ein myndugleiki ikki kann víkja frá lógarásettum krøvum, uttan at heimild var fyri hesum. Sambært fyrisitingarlógini skal ein avgerð, ið ikki til fulnar gongur partinum á møti, hava grundgeving. Siðvenjan hjá TAKS við bert at senda avgerðarskriv, tá ið munurin er yvir 300,- kr., var tí ikki í tráð við fyrisitingarlógina § 21. (LUM 200900065)*

### Grundgevingin skal vera nøktandi

Grundgevingin skal vera nøktandi og rættvísandi og skrivað á slíkan hátt, at hon ikki kann misskiljast.

*Í einari klagu um ikki at seta nakran í eitt lýst starv, var grundgevingin, "at førleikarnir, sambært fyriliggjandi upplýsingum, ikki vóru hóskandi til krøvini/ynskini, ið sett vóru til starvið". Tá umboðsmaðurin kannaði málið, vísti tað seg, at avgerðin í ítøkiliga málinum var grundað á upplýsingarnar frá øðrum arbeiðsgevara um, at klagarin skuldi "arbeiða seint". Umboðsmaðurin helt, at hetta átti at framgingið beinleiðis av skrivinum til umsøkjaran, og ikki at verið krógvað í almennum vendingum. (LUM 200500069)*

### Grundgevingin skal vera røtt

Ein grundgeving skal vera røtt á tann hátt, at hon sakliga skal viðgera tey viður-

skifti og metingar, sum veruliga hava verið grundarlag undir avgerðini. Um myndugleikin hevur tikið avgerð grundað á skeiva fatan av teimum veruligu umstøðunum, skal hetta síggjast aftur í avgerðini. Grundgevingin skal tí vísa tey atlit, sum myndugleikin veruliga hevur lagt dent á, og myndugleikin eigur ikki í grundgevingini at vísa til atlit, sum ongan týdning hava havt fyri avgerðina.

*Í klagu um starvssetan gav umboðsmaðurin eini kommunu eina álvarliga átalu fyri grundgevingina fyri ikki at bjóða klagaranum til setanarsamrøðu. Umboðsmaðurin metti, at klagarin var einasti av umsøkjarunum sum leyk útbúgvingarkrøvini í starvslýsingin. Í skrivinum til klagaran um, hví hann ikki hevði fingið starvið, varð sagt, at tann setti hevði nøktandi fakligar førleikar og serliga viðkomandi starvsroyndir. Einki var sagt um, hvørjar ítøkiligar førleikar talan var um, og á hvønn hátt førleikar og starvsroyndir hjá tí setta vóru betri egnaðar til starvið enn tær hjá klagaranum. Í einari eftirfylgjandi frágreiðing førdi kommunan m.a. fram, at orsøkin til, at klagarin ikki var boðin til samrøðu var, at setanarbólkurin hevði fatanina av, at klagarin ikki dugdi føroyskt. Av tí at setanarbólkurin ikki hevði havt setanarsamrøðu við klagaran, hevði setanarbólkurin einki prógv fyri, at klagarin ikki dugdi nóg væl føroyskt. Tað var tí ikki sakligt, eftirfylgjandi og uttan prógv, at vísa til, at setanarbólkurin hevði fatanina av, at klagarin ikki dugdi nóg væl føroyskt. (LUM 200700016)*

## Bert partar í málinum

Tað eru bert partar í einum máli, sum kunnu krevja at fáa eina grundgeving. Í einari klagu frá Maskinmeistarafelagnum staðfesti umboðsmaðurin, at felagið ikki hevði krav um grundgeving fyri avgerðini, tí hetta bert er galdandi mótvegis pørtunum í einum máli. Við tað at Maskinmeistarafelagið ikki var at meta sum partur í málunum, hevði tað ikki nakað krav uppá grundgeving. (LUM 200400077)

## Avleiðing

Kravið um grundgeving tvingar myndugleikan at vera neyvur við sínum kanningum og metingum, áðrenn avgerð verður tikin.

Vantandi grundgeving fyri ein fyrisitingarlig avgerð kann í ávísum førum hava við sær, at avgerðin er ógildig. Í áðurnevnda máli um setan av landsverkfrøðingi var niðurstøðan hjá umboðsmanninum, at hóast vantandi grundgevingin var eitt so álvarsligt brek, sum í ávísum førum kann føra við sær, at avgerðin er ógildig, so helt umboðsmaðurin ikki, at hetta gjørdi seg galdandi í hesum málinum, tí onki grundarlag var fyri at halda, at tann setti ikki var tann besti maðurin til starvið. Avgerðin um at seta hann í starvið kundi tí ikki metast at hava verið ógildig.

Umboðsmaðurin hevur higartil ongantíð víst á, at vantandi grundgeving hevur verið eitt so álvarsligt brek, at avgerðin átti at verðið ógildað.

------0------

Ásetingarnar um grundgeving eru at finna í kapitli 6 í løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg/om forvaltning og eru soljóðandi:





"§ 21. Tá ein avgerð verður fráboðað skrivliga, skal hon hava grundgeving uttan so, at avgerðin til fulnar gongur partinum á møti.

§ 22. Hann, sum munnliga hevur fingið boð um eina avgerð, kann krevja at fáa eina skrivliga grundgeving fyri avgerðini, uttan so, at avgerðin til fulnar gongur viðkomandi parti á møti. Áheitan um hetta skal verða latin myndugleikanum innan 14 dagar eftir, at parturin hevur fingið boð um avgerðina.

Stk. 2. Ein áheitan um skrivliga grundgeving sambært stk. 1, skal verða svarað skjótast gjørligt. Um áheitanin ikki er svarað innan 14 dagar eftir, at myndugleikin hevur fingið áheitanina, skal hesin geva partinum boð um orsøkina til hetta og nær áheitanin væntandi fer at verða svarað.

§ 23. Ein grundgeving fyri eini avgerð, skal hava eina tilvísing til tær rættarreglur, sum avgerðin er grundað á. Í tann mun, avgerðin eftir hesum reglum hvílir á eini fyrisitingarligari meting, skal grundgevingin eisini tilskila tey høvuðsfyrilit, ið hava verið avgerandi fyri útinningina av metingini.

Stk. 2. Grundgevingin skal eisini um neyðugt hava eina stutta frágreiðing viðvíkjandi teimum veruligu umstøðunum, sum hava havt stóran týdning fyri avgerðina.

Stk. 3. Grundgevingin kann verða avmarkað í tann mun áhugi partanna í at kunna nýta kunnleika til hesa til røkjan av sínum tørvi má metast at eiga at víkja fyri avgerandi umhugsni fyri honum sjálvum ella øðrum privatum ella almennum áhugamálum, jbr § 15."





Gurið Joensen, ráðgevi

# VII MÁLSVIÐGERÐARTÍÐ

*Málsviðgerðartíðin hjá almennum myndugleikum er ofta avgerandi fyri, um borgarar eru nøgdir við myndugleikan.*

Long málsviðgerðartíð kann hava bæði fíggjarligar og persónligar avleiðingar fyri viðkomandi borgara.

Sambært góðum fyrisitingarsiði eigur almennur myndugleiki at hava skipað arbeiðsgongdirnar soleiðis, at málsviðgerðin ikki gerst óneyðuga drúgv.

## Lógarásetingar og mál fyri málsviðgerðartíðina

Tað er av stórum týdningi, at almennir myndugleikar leggja dent á sína viðgerðartíð og javnan meta um, hvørt hon er nøktandi ella kann styttast.

Í fyrisitingarlógini eru ongar almennar reglur um málsviðgerðartíðina hjá myndugleikunum. Men sambært góðum fyrisitingarsiði skulu mál altíð viðgerast innan rímiliga tíð, og viðgerðin má ikki gerast ov langdrigin. Á ymiskum lógarøkjum eru ásettar serligar freistir fyri málsviðgerðini. Hetta er eitt nú galdandi fyri mál um innlit. Almenna umsitingin eigur at halda slíkar lógarásettar freistir.

Um eitt mál ikki kann avgreiðast innan hóskandi tíð, ella málsviðgerðartíðin gerst drúgvari, enn vanligt er, eigur myndugleikin at kunna borgaran um orsøkina til seinkanina, og nær tað kann væntast, at málið verður avgreitt.

Ein væl skipað arbeiðsgongd og raðfestingar, eitt nú eftir málslagi ella hvussu fjøltáttað málið er, eru oftast fortreytin fyri, at almennir myndugleikar kunnu viðgera og avgera flestu av sínum málum við neyðugum skjótleika.

## Rímilig málsviðgerðartíð

Har tað ikki eru lógarásettar freistir fyri málsviðgerðini, ber ikki til alment at siga, nær ein málsviðgerðartíð er hóskandi ella ov drúgv, tí metingin av, um málsviðgerðartíðin er ov drúgv, má gerast út frá umstøðunum í tí ítøkiliga málinum. Hóast hetta, so eiga almennir myndugleikar at seta sær mál fyri, hvussu skjót málsviðgerðartíðin á teirra øki skal vera í mun til tey sløg av málum, ið myndugleikin umsitur. Almenna umsitingin má í hesum sambandi taka atlit til, at tað fyri borgarar kann hava týdning, at ávís sløg av málum fáa skjótari viðgerð enn onnur sløg av málum, og at tað eisini er ymiskt, hvussu tíðarkrevjandi málsviðgerð myndugleikin kann seta í verk upp á ymisku sløgini av málum.

At ein almennur myndugleiki ikki hevur arbeiðsorku til at halda eina rímiliga viðgerðartíð, ella at viðgerðartíðin er drúgv, tí umsitingin hevur móttikið fleiri mál enn væntað, eru viðurskifti, sum subjektivt kunnu verða umberandi orsøk fyri langa viðgerðartíð. Men hetta broytir ikki upp á almennu fatanina av, hvat er rímilig og nøktandi viðgerðartíð fyri økið.

Um umsitingin má seta viðgerðina í einum máli í bíðistøðu eina tíð, eitt nú tí neyðugt er at fáa upplýsingar til vega, sum lýsa málið nøktandi, ella tí umsitingin má bíða eftir einum hoyringarsvari, kann hetta gera, at málsviðgerðartíðin gerst longri enn upprunaliga ætlað. At viðgerðartíðin undir slíkum umstøðum gerst drúgv, mugu borgarar sum høvuðsregla góðtaka. Í slíkum førum eigur myndugleikin at kunna borgaran um bíðistøðuna og grundina fyri henni.

## Kunning til partarnar í málinum

Best er at almennur myndugleiki kunnar alment um væntaðu viðgerðartíðina á sínum øki. Hetta kann eitt nú gerast á heimasíðu stovnsins og við at myndugleikin í síni móttøkuváttan kunnar um, hvussu long vanliga málsviðgerðartíðin er á viðkomandi øki.

Kann myndugleikin ikki halda væntaðu viðgerðartíðina, eigur hann at kunna borgaran um støðuna, hvør grundin er til seinkanina og nær væntast kann, at málið verður avgreitt.

Um borgari rykkir eftir svari upp á sítt mál, tí viðgerðin dregur út, eigur myndugleikin at svara rykkjaranum beinanvegin.

## Aðrar góðar viðgerðarmannagongdir

Góðar mannagongdir fyri málsviðgerðini eru ofta fortreytin fyri at kunna viðgera og avgera mál við hóskandi skjótleika.

Almennur myndugleiki hevur skyldu til at skipa eina arbeiðsgongd, sum tekur atlit til góðan fyrisitingarsið, herundir at almenn málsviðgerð skal vera so einføld, skjót og fíggjarliga tilsíggin sum gjørligt, og at viðgerðin ikki verður seinkað av óneyðugari formalismu, eitt nú við at fremja óneyðugar hoyringar ella útvega óneyðugar upplýsingar.

Í kravinum um, at ein almennur myndugleiki skal taka fíggjarligt atlit í síni málsviðgerð, liggur ikki bert eitt krav um at vera fíggjarliga tilsíggin, men eisini, at myndugleikin skal taka atlit til, hvønn fíggjarligan týdning tað hevur fyri borgaran, at málið verður avgreitt beinanvegin ella innan ávísa freist.

Myndugleikin kann, tá málið byrjar, gera eina skjóta gjøgnumgongd av málinum fyri at staðfesta, um myndugleikin er rætti myndugleiki at viðgera málið, um málið hastar ella ikki, og um málið er torgreitt ella einkult at avgreiða. Um myndugleikin leggur málsviðgerðina til rættis eftir hesi kanning av málum, skuldi myndugleikin havt møguleika fyri at skapa eina góða og skjóta viðgerðarmannagongd.

## Avleiðingar av langari málsviðgerðartíð

Ov drúgv málsviðgerðartíð gongur fyrst og fremst út yvir viðkomandi borgara. Harnæst skalar ov drúgv málsviðgerðartíð álitið á almennu umsitingina og kann føra til negativu umtalu av myndugleikanum.

Almennur myndugleiki kann eisini fáa átalu frá Løgtingsins umboðsmanni fyri ov langa viðgerðartíð.

Í ringasta føri kann ov drúgv málsviðgerð føra til, at almenni myndugleikin kann ábyrgdast eftir vanligum endurgjaldsreglum. Ein ítøkilig meting av, um treytirnar fyri ábyrgd og endurgjaldi eru loknar, eru avgerandi fyri, um almenni myndugleikin skal rinda endurgjald sum fylgja av ov drúgvari málsviðgerð.

## Løgtingsins umboðsmaður

Løgtingsins umboðsmaður hevur í fleiri málum viðgjørt spurningin um málsviðgerðartíð. Vísast kann eitt nú á hesi mál:

### LUM 16/00123 Drúgv málsviðgerðartíð av áheitan um innlit

Í hesum klagumáli hevði Hvalbiar kommuna beinanvegin boðað klagaranum frá, at innlitsáheitanin frá honum fór at verða avgreidd tvær vikur seinni, men hóast hetta og fleiri áminningar frá klagaranum, tók tað kommununi meginpartin av einum ári at avgreiða innlitsáheitanina. Umboðsmaðurin metti, at hvørki vavið á skjølunum ella umstøðurnar í málinum kundu umbera, at tað tók kommununi so drúgva tíð at avgreiða innlitsáheitanina.

Umboðsmaðurin gav kommununi eina álvarsliga átalu fyri at lata innlitsáheitanina liggja óavgreidda meginpartin av einum ári.

### LUM 201400040 Drál við at ummæla eina kæru

Klagan snúði seg um, at Heilsutrygd drálaði við at ummæla eina kæru, sum var send Kærunevndini í almanna- og heilsumálum.



Hóast fleiri áminningar lá áheitanin frá Føroya Kærustovni um eitt kærumál óviðgjørt hjá Heilsutrygd í 5 mánaðir. Hetta helt umboðsmaðurin vera átaluvert. Av tí at Heilsutrygd hevði svarað Kærustovninum, eftir at umboðsmaðurin hevði kunnað Heilsutrygd um klaguna, gjørdi umboðsmaðurin ikki meira við málið.

### LUM 201100058 Drúgv málsviðgerðartíð av einum heimvístum kærumáli

Klagumálið snúði seg um málsviðgerðartíðina hjá Umhvørvisstovuni av einum máli, sum Kærunevndin í lendismálum hevði heimvíst til nýggja viðgerð. Umboðsmaðurin hevði ongar viðmerkingar til málsviðgerðartíðini, tí sambært frágreiðingini frá Umhvørvisstovuni varð langa málsviðgerðartíðin grundað á, at talan var um mál, sum var fordømisskapandi, og at málsviðgerin varð neyðug, fyri at málið kundi verða upplýst til fulnar. Hinvegin helt umboðsmaðurin, at tað var brot á góðan fyrisitingarsið, at Umhvørvisstovan ikki svaraði áminninginum frá klagaranum. Umboðsmaðurin gav tí Umhvørvisstovuni eina átalu fyri ikki at hava hildið góðan fyrisitingarsið hesum viðvíkjandi. Harumframt viðmerkti umboðsmaðurin, at sambært góðum fyrisitingarsiði, eigur Umhvørvisstovan, tá ið málsviðgerðin í einum ítøkiligum máli dregur út, av sínum eintingum, og hóast partarnir ikki hava vent sær til hana, at kunna partarnir í málinum um, at málsviðgerðin vil taka longri tíð enn vanligt, og hvør orsøkin til hetta er.

### LUM 201000025 Drúgv viðgerðartíð í sambandi við útvegan av stovnsplássi

Klagumálið snúði seg um Almannastovuna og manglandi stovnstilboð til eina unga gentu. Umboðsmaðurin metti, at tann samlaða viðgerðartíðin á Almannastovuni hevði verið alt ov drúgv. Umboðsmaðurin helt tað als ikki vera ein nøktandi arbeiðsgongd innanhýsis á Almannastovuni, at tað gekk so long tíð, áðrenn frágreiðingar og skriv, sum høvdu stóran týdning fyri málið, komu fram til rætta

málsviðgera. Umboðsmaðurin viðmerkti, at serliga tá talan var um børn og ung, var tað av stórum týdningi, at viðgerðartíðin varð so stutt sum gjørligt.

Umboðsmaðurin heitti tí á Almannastovuna um skjótast møguligt at gera nakrar greiðar mannagongdir fyri handfaring av slíkum málum, og at lata seg frætta, hvørji stig Almannastovan ætlaði at taka fyri at stytta um málsviðgerðartíðina í slíkum málum.

## LUM 200800078 Klaga um málsviðgerðartíð í kærumáli um uppsøgn

Klagumálið snúði seg um málsviðgerðartíð hjá Innlendismálaráðnum í einum kærumáli um uppsøgn av havnameistara.

Umboðsmaðurin helt tað vera sera átaluvert, at Innlendismálaráðið hevði latið kæruna liggja í nærum eitt ár, áðrenn nakað hendi. Hetta hóast advokaturin hjá klagaranum hevði sent fleiri áminningarskriv til ráðið. Fyri umboðsmanninum at síggja, var tað ein avgreiðsluspurningur hjá Innlendismálaráðnum at senda málið til hoyringar hjá kommununi.

Eftir at advokaturin hjá kommununi hevði sent hoyringarskriv og skjøl til Innlendismálaráðið, gingu aftur 10 mánaðar til avgerð varð tikin.

Umboðsmaðurin helt hesa viðgerðartíð vera alt ov langa. Harumframt átalaði umboðsmaðurin, at Innlendismálaráðið ikki hevði svarað advokatinum hjá klagaranum upp á áminningarskriv hansara.

Samanumtikið gav umboðsmaðurin Innlendismálaráðnum eina álvarsliga átalu fyri óneyðuga longu málsviðgerðartíðina.

## LUM 200800051 Viðvíkjandi drúgvari málsviðgerðartíð av umsókn um skeinkiloyvi

Klagan snúði seg um drúgva málsviðgerðartíð av umsókn um skeinkiloyvi og vantandi grundgeving fyri, hví umsóknin ikki varð viðgjørd. Tá klagað varð til umboðsmannin, vóru gingnir knappar 9 mánaðir, síðan nevndin byrjaði at viðgera umsóknina. Nevndin vísti á, at viðgerðin av umsóknum um skeinkiloyvi kann taka longri tíð enn gott er, tí tað í høvuðsheitum er upp til umsøkjaran av útvega neyðugu upplýsingarnar. Sambært nevndini komst hetta av, at nevndin hevur avmarkaða orku til hetta.

Umboðsmaðurin viðmerkti, at tað er greitt, at viðgerðin av eini umsókn kann valdast, um umsøkjarin letur myndugleikanum neyðugar upplýsingar, og vanliga má ein umsøkjari eisini metast at hava ein serligan áhuga í at útvega hesar. Vantar myndugleikanum hinvegin upplýsingar frá umsøkjaranum, er tað skylda myndugleikans at vegleiða um, hvørjar vanta, og hvussu tær kunnu útvegast.

Sambært nevndarfrágreiðing frá fundi 4. okt. 2007 tørvaði nevndini nærri upplýsingar um møgulig revsiverd viðurskifti hjá umsøkjaranum fyri at kunna halda



áfram við viðgerðini. Tað framgekk tó hvørki av skjølunum í málinum ella av frágreiðingini frá nevndini, at nevndin hevur biðið umsøkjaran útvegað nevndini upplýsingar um hesi viðurskifti. Umboðsmaðurin helt tí, at viðgerðin dró út, tí nevndin ikki bað um tær upplýsingar, henni tørvaði. Sambært skjølunum sæst einki at henda í málinum, fyrr enn eitt hálvt ár eftir nevndarfundin, tá advokatur umsøkjarans spurdi eftir málinum. Aftaná hetta gingu her umframt knappar tríggir mánaðir aftrat, áðrenn Loyvisnevndin í juni 2008 vendi sær til Føroya Landfúta við fyrispurningi um møgulig revsiverd viðurskifti hjá umsøkjaranum.

Umboðsmaðurin gav Loyvisnevndini eina átalu fyri at lata 9 mánaðir ganga, áðrenn stig vóru tikin til at útvega nevndini vantandi upplýsingarnar.

# VIII UM EMBÆTIÐ

Sambært § 1 í løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann velur Løgtingið fyri eitt 5-ára skeið ein uttantingsmann at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins. Tann 2. desember 2015 legði løgtingsformaðurin uppskot fyri Løgtingið at velja meg aftur sum umboðsmann fyri eitt 5 ára skeið frá 2016 til 2021. Eg tók við embætinum á fyrsta sinni tann 1. januar 2006. Umframt meg sjálva hevur embætið verið mannað við løgfrøðiligu medarbeiðarunum mínum, Jóhannu Arge, Elinborg Apol, Gurið Joensen og Jette Eirikstoft, skrivstovuleiðara.

Við løgtingslóg kunnu verða gjørdar almennar reglur fyri virksemi umboðsmansins, sum annars í sínum starvi er óheftur av Løgtinginum (§ 3).

Virksemi umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins, t.e. bæði landsins og ta kommunalu (§ 4, stk. 1). Eisini feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, eru fevndir av virksemi umboðsmansins (§ 4, stk. 2). Harumframt eru interkommunalir felagsskapir undirlagdir virksemi umboðsmansins (§ 4, stk. 4). Harafturímóti fevnir virksemi hansara ikki um ríkismyndugleikar, Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum (§ 4, stk. 5).

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær umsitingareindir, sum eru fevndar av virksemi hansara, ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti borgaranum (§ 5). Ein og hvør kann senda umboðsmanninum klagu um tær í § 4 nevndu umsitingareindir, sum eru fevndar av virksemi hansara (§ 6, stk. 1). Klagarin skal navngeva seg í klaguni, og skal hon vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað (§ 6, stk. 2). Er talan um avgerðir, sum kunnu leggjast fyri hægri umsitingarmyndugleika, skal hesin møguleiki vera royndur fyrst, áðrenn klagað verður til umboðsmannin (§ 6, stk. 3). Eru hesar treytir loknar, tekur umboðsmaðurin støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í tí máli, ið klagað verður um (§ 6, stk. 4). Umboðsmaðurin kann eisini sjálvur av sínum eintingum taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi (§ 6, stk. 5). Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætisins vegna krevur at fáa fyrilagt. Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja øll tey støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum. Hann kann eisini stevna fólki í rættin at vitna um viðurskifti, ið eru avgerandi í kanningararbeiðinum (§ 8).

Tá umboðsmaðurin er liðugur við sínar kanningar, ger hann sína niðurstøðu, og metir hann, at álvarsligt mistak ella vansketni er framt, skal hann boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og/ella kommunustýri frá hesum. Hann hevur rætt til alment at finnast at, koma við tilmælum og á annan hátt gera vart við meting sína av einum máli, hann hevur kannað. Hann kann eisini





mæla viðkomandi myndugleikum til, at fríur rættargangur verður givin (§ 10). Rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum, skal hann boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum, og er talan um kommunal ella interkommunal viðurskifti, skal hann eisini boða viðkomandi kommunustýri frá (§ 12).

Tann 18. desember 2013 samtykti Løgtingið eina lógarbroyting, sum víðkaði heimildirnar hjá umboðsmanninum til at fevna um eitt serligt eftirlit við privatum stovnum v.m., sum hava til uppgávu at taka sær børnum og ungum (§ 4, stk.1).

Lógarbroytingin hevði eisini við sær, at Løgtingsins umboðsmaður fekk til uppgávu at tryggja og hava eftirlit við implementeringini av ST-Barnasáttmálanum, herundir rættindum hjá børnum, sum eru ásett í føroyskari lóggávu til tess at lúka skyldurnar hjá Føroyum sambært sáttmálanum (§ 6, stk. 6).

Lógin og ein vegleiðing um, hvussu ein kann klaga til Løgtingsins umboðsmann eru at finna í ársfrágreiðingini.

Adressan hjá umboðsmanninum er:

Løgtingsins umboðsmaður
undir Bryggjubakka 11
Postsmoga 2008, FO-110 Tórshavn
teldupostadressa: lum@lum.fo
Heimasíða: www.lum.fo



# IX SKJØL

## Skjal 1

**Løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann**

### 1. Partur

### Umboðsmaðurin og Løgtingið

**§ 1.** Løgtingið velur ein uttantingsmann fyri eitt 5 ára skeið at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins.

*2. stk.* Doyr umboðsmaðurin í embætistíð síni ella er hann av øðrum orsøkum ikki førur fyri at røkja starv sítt, ger formansskapur Løgtingsins av, hvør skal røkja starvið, til Løgtingið velur ein nýggjan umboðsmann. Tað sama er galdandi, um umboðsmaðurin biður um at verða loystur úr starvi, ella um Løgtingið loysir hann úr starvi smb. stk. 3.

*3. stk.* Hevur Løgtingið ikki longur álit á umboðsmanninum, kunnu tveir triðingar av løgtingsmonnunum loysa hendan úr starvi.

**§ 2.** Umboðsmaðurin, ið ikki kann sita á Løgtingi ella í kommunustýri, skal so vítt gjørligt hava løgfrøðiliga útbúgving.

**§ 3.** Við løgtingslóg kunnu verða gjørdar almennar reglur fyri virksemi umboðsmansins. Annars er umboðsmaðurin í starvi sínum óheftur av Løgtinginum.

### 2. Partur

### Heimildir

**§ 4.** Virksemið umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins (t.e. lands- og kommunalu), og viðurskifti hjá børnum á privatum stovnum v.m., hvørs uppgávur beinleiðis viðvíkja børnum.

*2. stk.* Lógin er eisini galdandi fyri feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, lógini um alment innlit ella lógini um viðgerð av persónsupplýsingum.

*3. stk.* Í meting sínari av kommunalari umsiting skal umboðsmaðurin vísa atlit til tær serligu umstøður, kommunufyrisiting virkar undir.

*4. stk.* Interkommunalir felagsskapir eru undirlagdir virksemi umboðsmansins.

*5. stk.* Virksemi umboðsmansins fevnir ikki um ríkismyndugleikar, Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum.

**§ 5**. Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær í § 4 nevndu umsitingareindir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

## 3. Partur

### Kærumál og egin mál

§ **6.** Ein og hvør kann senda umboðsmanninum klagu um tær í § 4 nevndu umsitingareindir.

*2. stk.* Tann, ið klagar, skal navngeva seg í klaguni. Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað.

*3. stk.* Klaga um avgerðir, ið møguligur hægri umsitingarmyndugleiki kann broyta, kann ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum. Freistin, ið er nevnd í 2. stk., skal í slíkum førum roknast frá tí degi, hægri myndugleikin tekur avgerð sína.

*4. stk.* Umboðsmaðurin tekur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í máli, ið klagað verður um.

*5. stk.*Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi.

*6. stk.* Umboðsmaðurin kann kanna viðgerðina hjá myndugleikunum av útvaldum málum.

*7. stk.* Umboðsmaðurin kann kanna allar stovnar, myndugleikar og tænastustøð, sum eru fevnd av virkisøkinum hjá umboðsmanninum.

## 4. Partur

### Kanningar

§ **7.** Ger umboðsmaðurin av at taka eina klagu til viðgerðar, skal hann beinanvegin kunna viðkomandi umsiting um innihaldið í klaguni, um ikki vandi er fyri, at hetta kann darva kanningini. Harumframt skal umsitingin biðjast um ummæli í málinum, áðrenn umboðsmaðurin tekur avgerð um at gera vart við meting sína av málinum smb. § 10, stk. 2. Umboðsmaðurin kann áseta tíðarfreist til ummæli.

§ **8.** Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætis vegna krevur at fáa fyrilagt.

*2. stk.* Umboðsmaðurin kann stevna fólki í rættin at vitna um viðurskifti, ið eru avgerandi í kanningararbeiðinum. Í slíkum førum eru reglurnar í rættargangslógini galdandi. Rættarfundirnir eru ikki almennir. Tann, ið klagan viðvíkur, hevur saman við hjáseta rætt at vera hjástaddur, meðan slík vitnisførsla fer fram.

*3. stk.* Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum.

*4. stk.* Metir umboðsmaðurin tað vera neyðugt, kann hann uttan rættarúrskurð kanna privatar stovnar v.m., hvørs uppgávur beinleiðis viðvíkja børnum, sbrt. § 4, stk. 1.

§ **9**. Umboðsmaðurin hevur tagnarskyldu um tey viðurskifti, hann í virksemi sínum fær kunnleika til. Tagnarskyldan stendur við, eftir at umboðsmaðurin fer úr starvi, og fevnir eisini um starvsfólk á umboðsmansstovninum.





## 5. Partur

## Niðurstøður

**§ 10.** Kemur umboðsmaðurin til ta niðurstøðu, at álvarsligt mistak ella vansketni er framt av einum av teimum í § 4 nevndu umsitingum, skal umboðsmaðurin boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og /ella kommunustýri frá hesum og koma við tilmæli til teirra.

*2. stk.* Umboðsmaðurin hevur rætt til alment at finnast at, koma við tilmælum, og á annan hátt gera vart við meting sína av máli, hann hevur kannað.

*3. stk.* Umboðsmaðurin kann mæla viðkomandi myndugleikum til, at fríur rættargangur verður givin, smb. rættargangslógini §§ 330 –336c, í málum, sum hava verið viðgjørd eftir hesi lóg.

**§ 11.** Umboðsmaðurin letur Løgtinginum ársfrágreiðing um arbeiðið sítt. Frágreiðingin verður almannakunngjørd áðrenn 1. juli.

*2. stk.* Boðar umboðsmaðurin Løgtinginum, landstýrismanni ella kommunustýri frá einum máli, ella tekur hann eitt mál við í ársfrágreiðing sína, skal hann upplýsa um, hvat viðkomandi hevur ført fram til verju sína.

**§ 12.** Rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum, skal umboðsmaðurin boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum. Er talan um viðurskifti, ið viðvíkja kommunalari ella interkommunalari umsiting, skal umboðsmaðurin eisini boða viðkomandi kommunustýri frá.

*2. stk.* Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, um galdandi lógir og fyrisitingarligar ásetingar eru sambæriligar við altjóða skyldur at tryggja barnarættindi, herundir sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá børnum. Rakar umboðsmaðurin við lýti í hesum sambandi, skal umboðsmaðurin boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum. Er talan um lýti í ásetingum, ásettar av eini kommunu, skal umboðsmaðurin boða viðkomandi kommunustýri frá.

**§ 13.** Um umboðsmaðurin krevur tað, kunnu dómstólarnir vísa frá sær privatmál móti umboðsmanninum vegna avgerðir, sum hann tekur við grundarlagið í hesi lóg.

## 6. Partur

## Lønar- og eftirlønarviðurskifti

**§ 14.** Lønarviðurskifti umboðsmansins, herundir eisini spurningin um eftirløn og bíðipening, verða ásett við løgtingslóg.

*2. stk.* Umboðsmaðurin kann ikki, uttan við loyvi Løgtingsins, vera í starvi hjá almennum ella privatum fyritøkum, virkjum ella stovnum.

*3. stk.* Møguligur spurningur um ógegni umboðsmansins í ávísari søk verður lagdur fyri formansskap Løgtingsins, sum, um mett verður, at talan er um ógegnið, útnevnir annan at viðgera hetta ávísa mál.



**§ 15.** Umboðsmaðurin kann krevja at verða loystur úr starvi við seks mánaða freist at galda frá seinasta degi í einum mánaði.

## 7. Partur

## Fyrisiting

**§ 16.** Umboðsmaðurin setir og loysir úr starvi starvsfólk síni.

**§ 17.** Tær útreiðslur, ið standast av umboðsmansstovninum, verða játtaðar á Løgtingsins fíggjarlóg.

*2. stk.* Umboðsmaðurin ger roknskap fyri virksemi stovnsins, hesin skal vera grannskoðaður av grannskoðara Løgtingsins.

## 8. Partur

## Ígildisreglur

**§ 18.** Henda lóg kemur í gildi 1. januar ár 2001.

*2. stk.* Klagur um viðurskifti í tíðarskeiðinum 1. januar 2000 og til henda lóg kemur í gildi, kunnu kortini leggjast fyri umboðsmannin til viðgerðar.

# Skjal 2

**Vegleiðing um Løgtingsins umboðsmann**

## Hvønn og hvat kunnu tygum klaga um

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við allari fyrisitingini undir heimastýrinum, tvs. bæði lands-, kommunalu og interkommunalu myndugleikunum.

Umboðsmaðurin kann viðgera klagur um avgerðir hjá myndugleikunum, eins og viðferð teirra av borgarum og málum.

Tygum kunnu t.d. klaga um eina noktan av einari umsókn, um tann valda viðgerðarháttin, um ta tíðina, sum hetta hevur tikið og / ella framferðarháttin hjá embætisfólkunum.

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at myndugleikarnir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

Dómstólarnir, Løgtingið, feløg og privatir persónar eru ikki almennir fyrisitingarmyndugleikar. Tí kann umboðsmaðurin ikki viðgera klagur um hesi. Donsku myndugleikarnir, sum t.d. løgreglan, hoyra ikki undir heimastýrið. Tí kann umboðsmaðurin heldur ikki viðgera klagur um hesar. Um tygum eru í iva um, hvørt tygum kunnu klaga til umboðsmannin um ein ávísan myndugleika, kunnu tygum altíð spyrja okkum.

## Hvussu kunnu tygum klaga

Um tygum ynskja at klaga, skulu tygum skriva til umboðsmannin og greiða frá, hvønn og hvat tygum ynskja at klaga um. Um tygum hava latið onkran annan klaga tygara vegna, skulu tygum leggja eina undirskrivaða fulltrú við klaguni. Tað lættir um málsviðgerðina, um tygum senda møgulig viðkomandi skjøl (brøv frá tygum, svar frá myndugleikunum o.s.fr.) saman við klaguni. Á hendan hátt fáa tygum eisini ofta skjótari svar, tí umboðsmaðurin vanliga hevur tørv á at síggja hesi skjøl.

## Hvat kann umboðsmaðurin gera

Um umboðsmaðurin eftir at hava kannað málið kemur til ta niðurstøðu, at hann gevur viðkomandi viðhald, kann hann finnast at tí myndugleikanum, sum klagan snýr seg um. Umboðsmaðurin kann eisini heita á myndugleikan um at umhugsa málið av nýggjum og taka eina aðra avgerð. Leggið til merkis, at umboðsmaðurin ikki sjálvur kann broyta eina avgerð. Uppgávan hjá umboðsmanninum er sostatt at greiða myndugleikanum frá, at hesin eftir hansara fatan hevur gjørt eitt mistak.





Í hesum sambandi skulu tygum hava í huga, at umboðsmaðurin hevur avmarkaðar møguleikar fyri at taka støðu til avgerðir, ið eru grundaðar á reinar metingar ella avgerðir, har tað krevst ein serligur førleiki (t.d. læknaligur).

## Hvat hendir, tá umboðsmaðurin fær eina klagu

Umboðsmaðurin hevur 3 møguleikar at svara eini klagu:

1. Klagan verður kannað nærri.
2. Klagan verður avvíst, tí at umboðsmaðurin ikki kann viðgera hana.
3. Umboðsmaðurin velur ikki at kanna málið.

*1. Klagan verður kannað nærri.*
Heldur umboðsmaðurin, at ein klaga skal kannast nærri, sendir hann hana til viðkomandi myndugleika og biður um eina viðmerking. Samstundis biður hann eisini um at læna møgulig skjøl í málinum. Viðmerkingin frá myndugleikanum verður vanliga send viðkomandi, sum fær møguleika at gera sínar viðmerkingar.

Hann, ið hevur klagað, verður vanliga kunnaður um gongdina í málinum.

Tá myndugleikin og viðkomandi hava gjørt sínar viðmerkingar til málið, er hetta vanliga klárt til endaligu niðurstøðu umboðsmansins. Alt eftir, hvussu nógv mál eru til viðgerðar hjá umboðsmanninum samstundis, og hvussu skjótt myndugleikarnir svara umboðsmanninum, mugu tygum rokna við, at tað kann ganga umleið eitt hálvt ár, áðrenn málið er liðugt viðgjørt.

*2. Klagan verður avvíst.*
Løgtingið hevur í umboðsmanslógini (lóg nr. 60 frá 10. mai 2000) sett mark fyri, nær umboðsmaðurin kann viðgera eina klagu:

*"Klaga um avgerðir, ið møguligur hægri umsitingarmyndugleiki kann broyta, kann ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum..." (§ 6, stk. 3)*

Um tað er møguligt at kæra eina avgerð til ein annan fyrisitingarmyndugleika, skal hetta sostatt verða roynt, áðrenn umboðsmaðurin kann viðgera málið. Avgerðir, sum verða fráboðaðar skrivliga, skulu geva eina vegleiðing um møguligar kærumøguleikar, áðrenn farast kann til umboðsmannin. Eru tygum í iva, kunnu tygum venda tygum til myndugleikan, sum hevur tikið avgerðina, ella møguliga til skrivstovuna hjá umboðsmanninum.

"...Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað." (§ 6, stk. 2)

Orðingin "viðurskifti" fevnir um alt, sum klagast kann um til umboðsmannin, t.d. viðgerðina av einum máli, málsviðgerðartíðina, avgerðina í málinum, atburðin o.s.fr. Klaga tygum um eina avgerð, skal hendan sostatt verða tikin innanfyri tað seinasta árið.

Inniheldur klagan til umboðsmannin viðurskifti, sum myndugleikin ikki áður hevur tikið støðu til, sendir umboðsmaðurin næstan altíð klaguna víðari til myndugleikan og biður hendan taka støðu til hesi viðurskiftini. Samstundis verður viðkomandi kunnaður um hetta, og biðin um at bíða við at klaga til umboðsmannin, til myndugleikin hevur tikið støðu í málinum. Kemur eingin nýggj klaga, ger umboðsmaðurin ikki meira við málið.

*3. Umboðsmaðurin velur ikki at kanna málið.*
Í umboðsmanslógini stendur:

*"Umboðsmaðurin tekur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í máli, ið klagað verður um." (§ 6, stk. 4)*

Umboðsmaðurin hevur sostatt ikki skyldu til at taka allar klagur upp til viðgerðar. Hann kann nokta at viðgera klaguna sum heild ella bert at viðgera ávís viðurskifti í hesari.

Umboðsmaðurin kannar altíð eina klagu gjølla, áðrenn hann tekur avgerð um at avvísa hana. Í tílíkum metingum verður vanliga hugt at, um tað eru útlit fyri, at umboðsmaðurin kann hjálpa viðkomandi.

Ofta skrivar ella ringir umboðsmaðurin til viðkomandi ella til myndugleikan, fyri at hava eitt trygt grundarlag fyri avgerð síni. T.d. kann hann biðja um skjølini í málinum.

Ein avvísing av at viðgera eina klagu kann sostatt vera úrslitið av einari víðfevndari málsviðgerð hjá umboðsmanninum.

## Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar

Umboðsmaðurin kann eisini kanna eitt mál, uttan at tað finst nøkur klaga hesum viðvíkjandi. Umrøða í fjølmiðlunum kann t.d. hava við sær, at umboðsmaðurin gerst varur við eitt mál, sum hann ynskir at kanna nærri. Onkuntíð kunnu klagur vera orsøk til, at umboðsmaðurin fer at kanna viðurskifti, sum tað ikki er klagað um.

Umboðsmaðurin kann sambært §§ 6, stk. 5 og 8, stk. 3 kanna stovnar og tænastustøð v.m., ið hoyra til virkisøki hansara.

# Um umboðsmannin og embætið

Løgtingið velur fimta hvørt ár ein Løgtingsins umboðsmann. Hevur Løgtingið ikki longur álit á umboðsmanninum kunnu 2/3 av limunum loysa hann úr starvi.

Umboðsmaðurin setir og loysir úr starvi starvsfólk síni.

Tygum kunnu ringja á tlf. 35 85 00, skriva teldupost til lum@lum.fo ella venda tygum til skrivstovuna undir Bryggjubakka 11, Tórshavn, um tygum hava spurningar.



# Skjal 3

Yvirlit yvir endaliga viðgjørdar klagur og frágreiðingar í 2017, har álit varð skrivað

Málini kunnu lesast á www.lum.fo

| Dagfesting | Mál nr. | Heiti |
|---|---|---|
| 16.03.2017 | 16/00107 | Klaga um Almannaverkið og vantandi løn fyri arbeiðsvenjing |
| 04.04.2017 | 17/00026 | Skyldan hjá Taks at fylgja eini kæruavgerð |
| 10.04.2017 | 16/00123 | Klaga um drúgva málsviðgerðartíð av áheitan um innlit |
| 02.05.2017 | 17/00032 | Klaga um inntriv hjá barnaverndartænastu í myndugleikan at umsita pening hjá umsorganaryvirtiknum børnum |
| 14.06.2017 | 17/00025 | Klaga um handfaringina hjá Tórshavnar kommunu í einum máli um at seta parkeringsforboð |
| 21.06.2017 | 16/00118 | Klaga um forboð ímóti at úttala seg um framhaldsdeild í einum skúla |
| 10.07.2017 | 16/00088 | Eftirlitsvitjan á Psykiatriska deplinum |
| 24.08.2017 | 14/00129 | Kanning av umsiting av veiðiloyvum í Fiskimálaráðnum |
| 27.10.2017 | 17/00054 | Klaga um brot á innlitslógina og notatskylduna |
| 02.11.2017 | 17/00040 | Klaga um at Búnaðargrunnurin hevur sýtt umsøkjara partsinnlit |
| 07.11.2017 | 17/00068 | Klaga um at VEKS ikki rættaði seg eftir eini avgerð hjá kærunevndini í almanna- og heilsumálum |
| 27.11.2017 | 17/00062 | Klaga um rættin til eftirløn sum landsstýrismaður við 60-ára aldur |
| 06.12.2017 | 17/00071 | Skriv til fíggjarmálaráðið um viðgerðina av eini kæru um avgerðina hjá TAKS at nokta innlit og kontradiktión |